ÁRSFRÁGREIÐING

2022

FØROYA KÆRUSTOVNUR

Ársfrágreiðing 2022 hjá Føroya Kærustovni ©
Sniðgeving og umbróting: AnniJanni
Prent: Føroyaprent

INNIHALDSYVIRLIT

1/ Inngangur 5
2/ Kærustovnurin 9
3/ Virksemið 2022 13
4/ Almanna-, familju- og heilsumál 17
5/ Skatta- og avgjaldsmál 29
6/ Lestrarstuðulsmál 35
7/ Lendismál 39
8/ Vinnumál 43
9/ Psykiatriska Sjúklingakærunevndin 51
10/ Skuldarumskipanarmál 55
11/ Høvuðsbarnaverndarnevndin 59
12/ Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini 69
13/ Tvingsilsnevndin 73

MIÐAL VIÐGERÐARTÍÐIRNAR LIGGJA MILLUM 5 DAGAR OG 5½ MÁNAÐIR

1/INNGANGUR

Komið er nú hálvan veg við umskipanini av Kærustovninum. Seks av nevndunum, sum Kærustovnurin hevur verið skrivstova hjá, eru nú niðurlagdar og málini verða ístaðin viðgjørd av Føroya Kærustovni.

Nýggja skipanin verður mett at roynast væl. Greitt er, at tað nú er skjótari at avgreiða kærufreistir, mál um avgerðarheimildir, áheitanir um uppafturtøku við meira, við tað, at slík mál, sum eru ivaleys, kunnu avgreiðast av einum løgfrøðingi á Kærustovninum.

Miðal viðgerðartíðirnar eru góðar hetta árið og eru eisini styttar á fleiri økjum í mun til undanfarna ár. Tær liggja millum 5 dagar og 5½ mánaðir.

Skipanin er eisini meiri smidlig á tann hátt, at mál verða viðgjørd, tá tey eru klár og verða ikki savnaði saman til mánaðarligan fund. Eisini er møguligt at vera liðilig í mun til ásetan av fundi, tá borgarar ynskja at møta og er mangan fundur, har bert eitt mál verður viðgjørt. Hetta ber serliga væl til í málum, har tað bert eru løgfrøðingar á Kærustovninum, sum skulu verða við í viðgerðini. Tá serkøn eisini skulu verða við og fundurin tí eisini skal samskipast í mun til hesi, er neyðugt at vera meiri støðuføst í mun til ásettar fundardagar.

Innihaldsliga verður eisini mett, at málini fáa eina gjøllari og harvið betri viðgerð við tað, at málini nú sum meginregla verða viðgjørd av trimum løgfrøðingum. Upplýsingar, lógargrundarlag og sjónarmið partanna verða á henda hátt lýst og umrødd meira gjølla, áðrenn niðurstøða verður gjørd.

Ein fyrimunur við hesum, at fleiri løgfrøðingar eru á flest øllum málum er, at vitanin um økini og førleikin at viðgera fleiri ymisk mál, verður breiddur út til fleiri løgfrøðingar á stovninum.

Hinvegin hevur júst hetta, at fleiri løgfrøðingar enn áður skulu seta seg so væl inn í nógv fleiri mál við sær, at Kærustovnurin skal seta størri løgfrøðiliga orku av til hvørt mál, enn eftir gomlu skipanini. Tørvurin á løgfrøðiligari orku inni á stovninum er tískil størri nú enn eftir gomlu skipanini. Hetta er ikki óvæntað og varð eisini gjørt vart við tað, áðrenn skipanin varð sett í verk

Skipanin við serkønum hevur eisini verið væleydnað. Skipanin er nú meiri smidlig og til ber at innkalla júst ta serfrøðina, sum verður mett neyðug til einstaka málið. Mett verður í hvørjum einstøkum føri, um málið kann avgreiðast av løgfrøðingum ella um serkøn eru neyðug fyri viðgerðina. Hetta bar ikki til eftir gomlu skipanini, har sama samanseting av fakkunnleikum tók støðu til øll mál. Soleiðis ber nú til dømis til at hava tannlækna við í viðgerð av máli, har metast skal um tannviðgerð og sálarfrøðing við í máli um samveru, um tað verður mett neyðugt.

Tá løgfrøðiligar tulkingar eru tað berandi í málinum, er ikki neyðugt at hava serkøn við í viðgerðini. Soleiðis kunnu mál um umsóknarfreistir, útrokningar, barnagjald v.m. avgreiðast av løgfrøðingum á Kærustovninum, uttan at serkøn eru við í viðgerðini.

Viðmerkjast skal, at á teimum økjum, sum hetta árið hava verið viðgjørd av Kærustovninum, er tað ikki eitt krav, at tey serkønu eru við, men verða tey serkønu tikin við, tá hetta verður mett neyðugt. Tey øki, sum verða løgd til Kærustovnin í 2023, er tað í flestu førum krav um, at serkøn eru við í viðgerðini.

Sum nevnt er komið hálva leið við umskipanini og arbeitt verður tí eisini komandi árið, bæði eftir nýggju skipanini, har Kærustovnurin tekur avgerðir og sum skrivstova hjá teimum nevndum, sum enn ikki er tiknar av.

Hóast nevndir eru niðurlagdar, verður hildið fast við leistinum at býta hesa ársfrágreiðing upp í partar eftir málsøkjum soleiðis, at tað framvegis ber til hjá áhugaðum at kunna seg um alt virksemið hjá stovninum ella bert at kunna seg við einstaka økið, sum viðkomandi er áhugaður í.

Annars kann viðmerkjast, at Fjølmiðlanevndin er ikki longur ein partur av virkseminum hjá Kærustovninum og virksemið hjá nevndini er sostatt heldur ikki ein partur av hesi ársfrágreiðing. Tann 1. juli 2022 varð skipanin broytt soleiðis, at formaðurin í Fjølmiðlanevndini nú hevur um hendi skrivstovuvirksemið hjá nevndini.

Tórshavn, februar 2023

Anja Hovgaard
stjóri

2/KÆRUSTOVNURIN

Kjarnuuppgávan hjá Føroya Kærustovni hevur fram til 1. januar 2022 verið, at vera skrivstova hjá kærunevndum, ið viðgera avgerðir hjá almennum myndugleikum.

Tann 23. november 2021 samtykti Løgtingið løgtingslóg um Føroya Kærustovn og hevði hetta við sær, at Føroya Kærustovnur fór frá at vera skrivstova hjá kærunevndum, ið viðgera avgerðir hjá almennum myndugleikum, til at vera ein sjálvstøðugur kærumyndugleiki fyri fyrisitingarligar avgerðir, tá tað er ásett í løgtingslóg ella við heimild í løgtingslóg. Harumframt fer Føroya Kærustovnur at taka avgerðir í málum, tá ið tað er ásett í løgtingslóg.

Í tíðarskeiðinum frá 1. januar 2021 til 1. januar 2024 fer Føroya Kærustovnur tí at vera í eini skiftistíð. Kærunevndir verða í hesum tíðarskeiðinum tiknar av og virkisøkið teirra flutt til Føroya Kærustovn.

Tann 1. januar 2022 vórðu tær fyrstu kærunevndirnar tiknar av. Talan var um Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum, Skatta- og avgjaldskærunevndina og Kærunevndina hjá Studna. Tær eftirverandi kærunevndir og nevndir verða tiknar av eftir eini tíðarætlan ásett í § 16 í Løgtingslóg nr. 147 frá 25. november 2021 um Føroya Kærustovn og virkisøkið teirra verður tá flutt til Føroya Kærustovn.

Inntil allar kærunevndir og nevndir eru tiknar av, virkar Føroya Kærustovnur í skiftistíðarskeiðinum fram til 1. januar 2024 sum skrivstova hjá hesum kærunevndum og nevndum.

2.1 Føroya Kærustovnur sum skrivstova hjá kærunevndum og nevndum

Kærustovnurin fyrireikar kærumál til Psykiatrisku sjúklingakærunevndina og Kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini. Kærustovnurin upplýsir málini og ger løgfrøðilig tilmæli til niðurstøðu, sum verða løgd fyri nevndirnar til støðutakan.

Eisini upplýsir og fyrireikar Kærustovnurin mál til Høvuðsbarnaverndarnevndina og Tvingsilsnevndina. Høvuðsbarnaverndarnevndin tekur m.a. avgerð um umsorganaryvirtøku av børnum og um familjuviðgerð á stovnum hjá landinum. Útgangsstøðið er, at barnaverndartænasturnar hava lýst málini til fulnar, áðrenn tey verða send Kærustovninum og er uppgávan tá fremst av øllum at kanna, um grundarlag er fyri at fylgja tilmælinum ella ikki, herundir at kanna, um upplýsingarnar eru nøktandi til støðutakan og at syrgja fyri at fáa til vega neyðugar upplýsingar, um hetta ikki er so.

Tvingsilsnevndin tekur bæði avgerð um góðkenning av inntrivum og viðger kærumál um inntriv. Inntrivini fevna m.a. um nýtslu av ávaringar- og peilingarskipanum, at halda persóni føstum í sambandi við reinføri, flyting uttan samtykki og forða fyri atgongd til internet. Uppgávan fevnir tí um at kanna, um grundarlag er fyri at fylgja tilmælinum frá Almannaverkinum ella kommununum, her undir at kanna, um upplýsingarnar eru nøktandi til støðutakan og at syrgja fyri at fáa til vega neyðugar upplýsingar, um hetta ikki er so. Harafturat er uppgávan at upplýsa og gera løgfrøðilig tilmæli um tey kærumál, sum Tvingsilsnevndin móttekur.

2.2 Føroya Kærustovnur sum sjálvstøðugur kærumyndugleiki

Føroya Kærustovnur er kærumyndugleiki fyri fyrisitingarligar avgerðir frá almennum myndugleikum, tá ið tað er ásett í lóg, løgtingslóg ella við heimild í løgtingslóg.

Tá kæra er innkomin sær Føroya Kærustovnur til, at málið verður upplýst, soleiðis at tað er klárt til støðutakan. Tá ið málið er fult upplýst, verður Føroya Kærustovnur settur við stjóranum og tveimum løgfrøðingum. Í serligum førum kann stjórin gera av, at Føroya Kærustovnur verður settur við stjóranum og fýra løgfrøðingum.

Í málum, har serkunnleiki verður mettur neyðugur fyri viðgerðina, kann Føroya Kærustovnur verða settur við stjóranum og einum ella tveimum løgfrøðingum umframt einum ella tveimum viðkomandi serkønum. Kærustovnurin viðger eisini umsóknir frá borgarum um eftirgeving, útsetan og umskipan av skuld, sum fyrr vórðu viðgjørdar av Skuldarumskipanarnevndini. Sí nærri kunning um kærunevndirnar og málsøkini, sum Føroya Kærustovnur umsitur á heimasíðuni hjá Kærustovninum.

NÝTT VIRKSEMI

Nýggj skattafyrisitingarlóg varð sett í gildi í 2022, sí løgtingslóg nr. 61 frá 2. mai 2022 um fyrisiting av skatti, tolli og avgjaldi. Ein avleiðing av hesari er, at tær kommunalu skattakærunevndirnar verða tiknar av og øki teirra flutt til Føroya Kærustovn.

Sambært § 21 í skattafyrisitingarlógini viðgera tær kommunalu skattakærunevndirnar tær kærur, sum eru latnar inn áðrenn gildiskomuna 3. mai 2022, og Føroya Kærustovnur viðger kærur, ið eru latnar eftir kunngerðardagin.

Við hesum fær kærarin rætt til at kæra beinleiðis til Føroya Kærustovn, ið tekur endaliga avgerð innan fyrisitingina. Við hesum verður skipanin við, at hesar avgerðir, sum tær einastu av málunum, sum hoyra til Føroya Kærustovn, kunnu roynast í tveimum fyrisitingarligum rættarstigum, tikin av.

STARVSFÓLK

Starvsfólkatalið á stovninum eru umleið 12½ fulltíðarstørv. Starvssamansetingin fevnir um 1 stjóra, 8½ løgfrøðingar, 1 deildarleiðara og 2 skrivstovufólk.

FÍGGJARVIÐURSKIFTI

Fíggjarjáttanin hjá Kærustovninum 2022:

Lønir v.m.	kr.	8.513.000
Keyp av vørum og tænastum	kr.	937.000
Keyp av útbúnaði, netto	kr.	104.000
Leiga, viðlíkahald og skattur	kr.	372.000
Flyting frá ALS	kr.	- 150.000
Flyting frá barsil	kr.	- 50.000
Gjald fyri kærur	kr.	- 4.000
Nettoútreiðslujáttan	**kr.**	**9.926.000**

Allar nevndirnar, undantikið Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini, verða samsýntar av játtanini hjá Kærustovninum.

3/VIRKSEMIÐ Í 2022

NÝGGJ MÁL

Tilsamans 315 nýggj mál eru innkomin til Kærustovnin í 2022 og eru hetta væl færri enn bæði undanfarnu árini, tá ávikavist 370 og 367 mál vórðu móttikin. Innkomna talið av málum er eisini lægri í 2022, enn tað hevur verið seinastu sjey árini.

Vanliga málstalið er ymiskt frá øki til øki og eitt ávíst sveiggj í samlaða talinum av innkomnum málum er tí ikki óvanligt.

Í mun til hetta árið er serliga vert at leggja til merkis stóru minkingina í innkomnum málum til Høvuðsbarnaverndarnevndina. Innkomna talið av málum til hesa nevnd eru ikki bara nógv færri enn undanfarna árið, men eisini færri enn øll hini sjey árini, sum Kærustovnurin hevur verið skrivstova hjá nevndini.

Ein onnur minking, sum skal nevnast, er innan psykiatriøkið. Í tali fylla hesar kærur ikki so nógv, men tá talið av innkomnum kærum á psykiatriøkinum fer frá 13 í 2021 til 4 í 2022, er talan um eina lutfalsliga stóra minking. Eisini á hesum økinum er kærutalið ikki bara minni enn undanfarna ár, men eisini minni enn seinastu sjey árini.

Eitt annað, sum er serstakt við hesum árinum er, at ongin kæra um lestrarstuðul var móttikin. Kærutalið á hesum økið hevur seinastu árini ikki verið serliga høgt, men ongantíð fyrr hevur tað verið soleiðis, at ongin kæra er móttikin.

Hinvegin er vert nevna, at innkomnu kærurnar á skatta- og avgjaldsøkinum eru fleiri enn undanfarna ár, sum tó ikki var serliga høgt og er innkomna talið av kærum á skatta- og avgjaldsøkinum tí á nakað sama støði, sum árini 2019 og 2020.

Nevnast kann eisini, at Tvingsilsnevndin annað árið á rað bert hevur móttikið 14 tilmæli og er hetta nógv færri enn roknað varð við, tá nevndin varð stovnsett.

315
NÝGGJ MÁL



AVGREIDD MÁL

Avgreidd eru 347 mál í 2022 og er hetta nakað minni enn bæði undanfarnu árini, tá ávikavist 366 og 369 mál vórðu avgreidd. Tó má sigast, at talið av avgreiddum málum hevur ligið rættiliga støðugt seinastu sjey árini, við undantaki av einum sveiggi í 2016, tá serliga nógv mál vórðu avgreidd.

Tó at stórur munur ikki er á talinum av avgreiddum málum, er býtið millum ymsu økini nakað øðrvísi enn undanfarna ár. Soleiðis er talið av avgreiddum málum innan almanna-, familju- og heilsumál nógv fleiri í 2022 enn undanfarna ár, samstundis sum nógv færri barnaverndarmál eru avgreidd í mun til undanfarna ár. Mál innan økini psykiatri, tvingsil og barnavernd hava so mikið stuttar viðgerðartíðir, at tey stórt sæð verða avgreidd sama árið, sum tey eru móttikin. Talið av innkomnum málum samsvara tí stórt sæð við talinum av innkomnum málum, og tá færri mál eru móttikin, hevur hetta eina beinleiðis ávirkan á talið av avgreiddum málum. Minkingin í innkomnum málum sæst soleiðis aftur í avgreiddum málum.

347

AVGREIDD MÁL



MÁL UM INNLIT

Umframt vanligu málini, eru eisini umbønir um innlit viðgjørdar. Talan kann vera um umbønir um alment innlit frá t.d. fjølmiðlum ella partsinnlit frá pørtum í einum máli.

5 umbønir um innlit eru viðgjørdar í 2022. Tríggjar av hesum snúðu seg um vinnumál, ein um psykiatrimál og ein um skatta- og avgjaldsmál.

5

MÁL UM INNLIT

VIÐGERÐARTÍÐIN

Miðal viðgerðartíðarnar verða hetta árið mettar at vera góðar á øllum økjum og eru tær eisini styttar á fleiri økjum í mun til undanfarna ár.

Til dømis er miðal viðgerðartíðin fyri skatta- og avgjaldsmál knappar fýra mánaðir í 2022 og er hetta góðar tveir mánaðir styttri enn miðal viðgerðartíðin árið frammanundan. Ein miðal viðgerðartíð á fýra mánaðir fyri hetta slagið av málum, sum mangan eru torskild og umfatandi, verður mett at vera sera góð.

Viðgerðartíðirnar eru annars ymiskar, eins og málini eru ymisk í vavi og torleika. Longsta miðal viðgerartíðin hetta árið, sum er fimm og ein hálvan mánaða, er fyri mál um skuldarumskipan, men verður hetta mett at vera ein góð viðgerðartíð fyri hetta slagið av málum. Stytsta miðal viðgerðartíðin, sum er fimm dagar, er sum vant at finna hjá Psykiatrisku sjúklingakærunevndini.

Viðgerðartíðirnar verða á øllum økjum roknaðar frá tí degi, málið er innkomið til Kærustovnin, til tað er avgreitt á fundi. Íroknað viðgerðartíðina er sostatt tann tíðin, tað tekur at fáa málið lýst hjá avvarðandi myndugleika, hoyrt partarnar og framleitt løgfrøðiligt upprit um málið.



4/ALMANNA-, FAMILJU- OG HEILSUMÁL

Tann 1. januar 2022 varð Kærunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum tikin av og virkisøkið hennara flutt til Føroya Kærustovn.

Hetta hevur millum annað havt við sær, at kæra send kærunevndini, sum ikki varð avgreidd áðrenn 1. januar 2022, er viðgjørd og avgreidd av Føroya Kærustovni.

VIÐGERÐAREKIÐ

Mál, sum verða bólkað sum almanna-, familju- og heilsumál, eru kærur um:

- Avgerðir hjá Almannaverkinum eftir m.a. almannapensjónslógini, dagpeningalógini, lóg um almannatrygd og tænastur o.ø.
- Avgerðir hjá Sjúkrahúsverkinum, sum ikki eru um heilsufakligt virksemi.
- Avgerðir hjá kommunustýrum eftir lóg um barna- og ungdómstannrøkt.
- Avgerðir hjá Heilsutrygd og tilskotsnevndini eftir lóg um almenna heilsutrygd.
- Avgerðir hjá kommunalum stovnum eftir lóg um heimatænastu og eldrarøkt, og lóg um barnavernd, sum ikki kunnu leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina.
- Avgerðir hjá Familjufyrisitingini eftir lóg um rættarstøðu barnanna, lóg um foreldramyndugleika og samveru, verjumálslógini o.ø.

NÝGGJ MÁL

Í 2022 vórðu 111 kærur latnar Føroya Kærustovni viðvíkjandi almanna-, familju- og heilsumálum. Talið av móttiknum málum er á sama støði sum undanfarin ár, eins og býtið av málum, fevnd av almanna-, familju- og heilsumálum, er tað sama sum undanfarin ár.

Móttiknar vórðu 90 kærur um avgerðir hjá Almannaverkinum. Níggju kærur um avgerðir frá Familjufyrisitingini vórðu latnar Føroya Kærustovni, átta kærur um avgerðir frá kommunalum stovnum og fýra kærur viðvíkjandi sjúkrahúsverkinum vórðu latnar Føroya Kærustovni.



BÝTIÐ AV MÓTTIKNUM MÁLUM

	2020	2021	2022
Almannapensjónslógin – ískoyti, afturgjald, eftirrokning v.m.	12	10	15
Almannapensjónalógin – tillutan, hækkan, broyting v.m.	10	14	13
Barnaverndarlógin	8	4	4
Dagpeningalógin	10	25	18
Dagstovnalógin	0	0	1
Heilsutrygdarlógin	3	0	0
Hjúnabandslógin	1	0	0
Innlit	3	1	0
Lóg um almannatrygd og tænastur	22	24	23
Lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk	6	6	8
Lóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar	4	1	4
Lóg um familjuískoyti	0	5	4
Lóg um foreldramyndugleika og samveru	10	8	4
Lóg um heimatænastu	0	1	3
Lóg um rættarstøðu barnanna	5	7	4
Lóg um sjúkrahúsverkið	4	1	4
Lóg um stuðul til uppihaldspening	3	2	3
Verjumál	3	1	1
Annað	0	0	2
Í alt	**104**	**110**	**111**

AVGREIDD MÁL

Føroya Kærustovnur avgreiddi í alt 133 kærur um avgerðir innan almanna-, familju- og heilsumál. Av hesum málum fullu 19 kærur burtur, áðrenn tær vórðu klárar til støðutakan. Føroya Kærustovnur hevur sostatt tikið avgerð í 114 málum, harav seks teirra vórðu avgreidd av stjóranum ella løgfrøðingi á Føroya Kærustovni sambært § 4 í lóg um Føroya Kærustovn.

Í 17 málum varð Føroya Kærustovnur settur við stjóranum og tveimum løgfrøðingum, umframt einum serkønum. Í 14 av hesum málum varð Kærustovnurin settur við einum lækna, sum serkønur. Málini, sum lækni var við at avgreiða, vóru átta mál viðvíkjandi kærum um avgerðir frá Almannaverkinum viðvíkjandi fyritíðarpensjón, tvey mál viðvíkjandi kæru um avgerð um sýtan av dagpeningi vegna sjúkt barn, trý mál viðvíkjandi kæru um avgerð um sýtan av fíggjarligum ískoyti til meirútreiðslu av serkosti og eitt mál um kæru um avgerð viðvíkjandi sýtan av umsókn um tillagað starv.

Kærustovnurin var í einum máli settur við einum sálarfrøðingi sum serkønur at viðgera kæru um avgerð hjá Familjufyrisitingini at sýta foreldri samveru við barn sítt. Í tveimum málum varð Kærustovnurin settur við einum tannlækna sum serkønur at viðgera kæru um avgerð hjá Almannaverkinum um ávikavist at sýta umsókn um endurgjald fyri neyðugar meirútreiðlsur og at sýta umsókn um stuðul til hjálparráð.

BÝTIÐ AV AVGREIDDUM MÁLUM

	2020	2021	2022
Almannapensjónslógin – ískoyti, afturgjald, v.m.	12	7	23
Almannapensjónslógin – tillutan, hækkan, v.m.	15	10	12
Barnaverndarlógin	8	1	6
Dagpeningalógin	11	17	20
Dagstovnalógin	0	0	0
Heilsutrygdarlógin	3	0	0
Hjúnabandslógin	1	0	0
Innlit	3	0	1
Lóg um almannatrygd og tænastur	17	18	31
Lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk	4	6	5
Lóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar	3	2	5
Lóg um familjuískoyti	2	1	3
Lóg um foreldramyndugleika og samveru	7	9	4
Lóg um heimatænastu	0	1	2
Lóg um rættarstøðu barnanna	6	6	5
Lóg um stuðul til uppihaldspening	2	2	2
Lóg um sjúkrahúsverkið	4	2	4
Ættleiðing	1	0	0
Verjumál	2	1	2
Annað	5	11	8
Í alt	**105**	**94**	**133**

AVGREIÐSLAN



ALMANNAVERKIÐ

AVGREIÐSLAN AV MÁLUM HJÁ ALMANNAVERKINUM

Føroya Kærustovnur hevur í 2022 avgreitt 109 kærur um avgerðir frá Almannaverkinum. Málsøkið hjá Almannaverkinum er víttfevnandi og tekur Almannaverkið avgerðir innan nógv ymisk málsøkir, ið eru at meta sum almanna-, familju- og heilsumál.

Í 2022 hevur Føroya Kærustovnur avgreitt kærur um avgerðir frá Almannaverkinum innan hesi málsøkir:

Almannapensjónslógin

Í 2022 avgreiddi Føroya Kærustovnur 35 kærur um avgerðir frá Almannaverkinum tiknar eftir almannapensjónslógini, harav 23 teirra vórðu staðfestar og tríggjar broyttar. Tvær vórðu heimvístar og sjey kærur fullu burtur.

Tvær avgerðir vórðu heimvístar til nýggja viðgerð, tí mett varð ikki, at málið var nøktandi lýst, til at setti Kærustovnurin kundi gera eina haldgóða meting av upplýsingunum í málinum og taka avgerð í málinum. Fimm kærur fullu burtur, tí Almannaverkið tók avgerð um at endurskoða kærdu avgerðina og ein kæra fall burtur, tí Almannaverkið tók nýggja avgerð í málinum. Ein kæra fall burtur, tí kærarin tók kæruna aftur.

Kærustovnurin tók í 2022 avgerð um at broyta tríggjar avgerðir frá Almannaverkinum eftir almannapensjónslógini. Tvær teirra vóru avgerðir viðvíkjandi útgjaldi og útrokning av fólkapensjón, har Almannaverkið hevði sýtt kærarunum at venda aftur til skipanina, har fólkapensjón teirra varð roknað eftir felags inntøku teirra sum hjún. Kærustovnurin metti ikki, at heimild var fyri at nokta kærarunum at venda aftur til gomlu skipanina og broytti tí avgerðina hjá Almannaverkinum soleiðis, at pensjónin hjá kærarunum aftur kundi verða roknað eftir felags inntøku teirra.

Ein avgerð viðvíkjandi útgjaldi av fyritíðarpensjón til persón fevndur av § 28, stk. 3, í almannapensjónslógini varð broytt, tí Kærustovnurin var av teirri áskoðan, at viðkomandi kom undir nevndu áseting tá endaligur dómur varð avsagdur, og ikki tá dómur varð avsagdur í fyrsta instansi, sum Almannaverkið annars hevði tikið avgerð um.

Lóg um almannatrygd og tænastur

Kærustovnurin avgreiddi í 2022 tilsamans 31 kærur um avgerðir eftir lóg um almannatrygd og tænastur. Harav vórðu 20 staðfestar, tríggjar broyttar og tvær heimvístar til nýggja viðgerð hjá Almannaverkinum. Seks kærur fullu burtur.

Tríggjar kærir fullu burtur, tí Almannaverkið tók nýggja avgerð í málinum og vóru hesar avgerðir til fyrimuns fyri kærararnar. Ein kæra fall burtur, tí Almannaverkið boðaði frá, at Almannaverkið fór at taka málið upp til nýggja viðgerð. Ein kæra fall burtur, tí kærarin tók kæruna aftur og ein fall burtur, tí Almannaverkið ógildaði kærdu avgerðina.

Ein avgerð viðvíkjandi endurgjaldi fyri mista arbeiðsinntøku varð partvíst broytt. Kærarin hevði fingið játtað parttíðar inntøkumiss og kært varð um upphæddina og játtaðu nøgdina av tímum, sum kærarin hevði fingið játtað endurgjald fyri. Kærustovnurin broytti upphæddina, sum kærarin hevði fingið útgoldið ein mánað, men staðfesti avgerðina um játtaða tímatalið fyri sama mánað.

Kærustovnurin partvíst broytti og partvíst heimvísti eina avgerð um lutvísa játtan av stuðli til tannviðgerð, tí mett varð, at stuðul skuldi játtast til ávísar umvælingar, ið vóru neyðugar hjá kæraranum. Ein partur av avgerðini varð heimvístur til nýggja viðgerð, tí tað ikki fyrilógu upplýsingar í málinum, soleiðis at Kærustovnurin nærri kundi meta um, hvørt talan var um vanligar ella neyðugar viðgerðir, sum stuðul kundi játtast til ella ikki.

Ein avgerð um sýtan av umsókn um hjálparráð varð broytt, tí Kærustovnurin í sambandi við viðgerðina av málinum staðfesti, at søkt varð um hjálparráð, ið varð mett at vera bíligasta nøktandi loysnin, sum er treyt fyri at stuðul kann veitast.

Dagpeningalógin

Føroya Kærustovnur avgreiddi 20 kærur um avgerðir eftir dagpeningalógini, harav 13 avgerðir frá Almannaverkinum vórðu staðfestar. Kærustovnurin tók avgerð um at broyta tríggjar avgerðir hjá Almannaverkinum og vórðu tríggjar avgerðir heimvístar til nýggja viðgerð hjá Almannaverkinum. Ein kæra fall burtur, tí Almannaverkið tók nýggja avgerð í málinum og játtaði kæraranum dagpening, sum annars varð sýtt honum.

Kærustovnurin broytti eina avgerð hjá Almannaverkinum, sum hevði tikið avgerð um at steðga útgjaldi av dagpeningi vegna sjúku, tí kæraran hevði fingið útgoldið dagpening í tilsamans 52 vikur í einum 18 mánaðar tíðarskeiði. Kærustovnurin broytti avgerðina hjá Almannaverkinum tí mett varð, at kærarin kom undir ásetingina, sum loyvir undantak til regluna um at dagpeningur bert kann vera veittur í 52 vikur í einum 18 mánaða skeiði, tá persónurin hevur álvarsliga ella lívshættisliga sjúku ella hevur verið fyri skaðatilburði, har tað ikki ber til at siga, um viðkomandi verður varandi sjúkur ella aftur vinnur sær arbeiðsføri.

Ein avgerð hjá Almannaverkinum um at sýta foreldri dagpening vegna sjúkt barn varð broytt, tí Kærustovnurin metti, at grundarlag var fyri at staðfesta, at talan var um álvarsligan vanda fyri heilsustøðuni hjá barninum og at kærarin tí hevði rætt til dagpening vegna sjúkt barn.

Kærustovnurin broytti harumframt eina avgerð, har Almannaverkið hevði tikið avgerð eftir almannapensjónslógini, og steðga játtan av dagpeningi og kravt útgoldnan dagpening afturgoldnan. Kærustovnurin vísti á, at málið av røttum skuldi viðgerast eftir dagpeningalógini og at rætturin til dagpening ikki datt burtur við tillutan av framskundaðari pensjón svarandi til miðal fyritíðarpensjón. Grundarlag var tí ikki fyri at steðga játtanini av dagpeningi og krevja útgoldnan dagpening afturgoldnan.

Tríggjar avgerðir vórðu heimvístar til nýggja viðgerð hjá Almannaverkinum tí mett varð, at tørvur var á at fáa greiðu á nærri umrøddum viðurskiftum áðrenn endalig avgerð kundi takast í einstøku málunum.

Lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk

Fimm kærur um avgerðir eftir lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk vórðu avgreiddar í 2022, og vórðu fýra teirra staðfestar. Ein avgerð varð heimvíst til nýggja viðgerð hjá Almannaverkinum, tí nýggjar upplýsingar komu fram í sambandi við kæruviðgerðina og var Kærustovnurin av teirri áskoðan, at nýggju upplýsingarnar átti at verið eftirkannaðir av lækna, sum hevði úttalað seg um og kannað kæraran í 2021.

Lóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar

Kærustovnurin avgreiddi í 2022 tilsamans fimm kærur um avgerðir eftir lóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar. Tvær avgerðir vórðu staðfestar og tríggjar avgerðir vórðu heimvístar til nýggja viðgerð hjá Almannaverkinum.

Tvær avgerðir viðvíkjandi sýtan av serligum barnaískoyti vórðu heimvístar, tí Kærustovnurin metti ikki, at avgerðirnar vóru nøktandi grundgivnar. Heitt varð á Almannaverkið um at fáa fleiri upplýsingar til vega, soleiðis at greiða kundi fáast á, um kærararnir vóru fevndir av ásetingunum í lógini. Ein avgerð um afturgjaldskrav av ov nógvum útgoldnum barnagjaldi varð heimvíst, tí mett varð, at avgerðin hjá Almannaverkinum var ófullfíggjað og vantaði eina ítøkiliga meting av, hvørt kærarin hevði móttikið ov nógv útgoldna barnagjaldið móti betri vitandi.

Lóg um familjuískoyti

Tríggjar avgerðir eftir lóg um familjuískoyti vórðu avgreiddar í 2022. Tvær avgerðir vórðu staðfestar og ein avgerð varð heimvíst til nýggja viðgerð hjá Almannaverkinum. Kærustovnurin heimvísti eina avgerð um sýtan av familjuískoyti, tí mett varð at málið var ikki lýst til fulnar. Heitt varð á Almannaverkið um at fáa fleiri upplýsingar til vega soleiðis at greiða kundi fáast á, um kærarin hevur rætt til familjuískoyti sum stakur uppihaldari.

Lóg um stuðul til uppihaldspening

Kærustovnurin avgreiddi í 2022 tvær kærur um avgerðir eftir lóg um stuðul til uppihaldspening, og vórðu báðar avgerðirnar frá Almannaverkinum staðfestar.

Vísast kann á, at viðkomandi, ið er álagdur at rinda barna- og hjúnafelagagjøld kann søkja Almannaverkið um stuðul til uppihaldspening.

Annað

Føroya Kærustovnur hevur í 2022 í fimm kærum um avgerðir frá Almannaverkinum tikið støðu til, hvørt kærufreistin, sum ásett er í Lóg um Føroya Kærustovn var hildin, og hvørt grundarlag var fyri at loyva frávik frá kærufreistini. Í fýra málum sýtti Kærustovnurin kæraranum frávik frá kærufreistini, tí mett varð ikki, at talan var um serstakt føri, sum kundi loyva frávik frá kærufreistini. Í einum máli varð loyvt frávik frá kærufreistini, tí mett varð, at kærarin hevði tikið neyðugu stigini til at kæra rættstundis og at orsøkirnar til at kæran var móttikin ov seint, ikki skuldu liggja kæraranum til last.

Føroya Kærustovnur sýtti í tveimum førum at taka mál upp til nýggja viðgerð, tí mett varð ikki, at víst var á nýggjar faktiskar upplýsingar í málinum, ið kundu føra til eina aðra niðurstøðu í málinum, enn tá Kærustovnurin tók fyrstu avgerðina. Harumframt metti Kærustovnurin, at víst var ikki á rættarligar manglar ella manglar í viðgerðini annars, ið góvu grundarlag fyri uppafturtøku.

Kærustovnurin tók avgerð um at burturvísa eina kæru, tí kæran ikki var fevnd av málsøkinum hjá Føroya Kærustovni.

Omanfyrinevndu mál verða burturvíst og Føroya Kærustovnur viðger ikki kæruna nærri. Í 2022 hevur Føroya Kærustovnur sostatt tikið avgerð um at burturvísa átta kærur um avgerðir frá Almannaverkinum.

AVGREIÐSLAN AV MÁLUM HJÁ ALMANNAVERKINIM

	2020	2021	2022
Staðfest	43	42	66
Broytt	5	8	9
Heimvíst	3	4	12
Burturfallin	14	7	14
Burturvíst	2	4	1
Kærufreist	3	6	5
Uppafturtøka	-	2	2
Í alt	**70**	**73**	**109**

2020



2021



2022



GG! Í uppgerðini i %, er sæð burtur frá málum, sum eru burturvíst, málum um kærufreist og uppafturtøku.

KOMMUNURNAR

AVGREIÐSLAN AV MÁLUM HJÁ KOMMUNUNUM

	2020	2021	2022
Staðfest	5	2	1
Heimvíst	1	-	1
Burturfallin	-	-	3
Burturvíst	3	1	3
Kærufreist	2	-	-
Í alt	**11**	**3**	**8**

Føroya Kærustovnur hevur í 2022 avgreitt átta kærur um avgerðir frá kommunalum stovnum.

Kommunalir stovnar fevna millum annað um Barnaverndarstovuna, barnaverndartænastur og heimatænastur kring landið. Hesir stovnar taka avgerðir eftir millum annað barnaverndarlógini, dagstovnalógini og lóg um heimatænastu v.m., sum kunnu kærast til Kærustovnin.

Kærustovnurin avgreiddi tilsamans seks kærur um avgerðir frá barnaverndartænastum í Føroyum. Tríggjar fullu burtur og tríggjar vórðu burturvístar. Kærurnar sum vórðu burturvístar vórðu burturvístar av teirri orsøk, at talan ikki var um fyristingarligar avgerðir eftir barnaverndarlógini fevndar av málsræði Kærustovnsins. Tríggjar kærur fullu burtur, tí umstøðurnar broyttist soleiðis at grundarlag ikki longur var fyri at fasthalda kærurnar.

Tvær kærur um avgerðir eftir lóg um heimatænastu, eldrarøkt, v.m. vórðu avgreiddar í 2022. Ein avgerð varð staðfest og ein heimvíst til nýggja viðgerð. Ein avgerð varð heimvíst, tí mett varð, at avvarandi myndugleiki skuldi taka støðu til og meta um nærri ásett viðurskifti, áðrenn støða kundi verða tikin til, um undantak kundi gerast, soleiðis at kærarin kundi fáa samsýning, sum søkt varð um, útgoldið við afturvirkandi kraft.

SJÚKRAHÚSVERKIÐ

AVGREIÐSLAN AV MÁLUM HJÁ SJÚKRAHÚSVERKINUM

	2020	2021	2022
Staðfest	3	1	-
Burturfallin	1	-	-
Burturvíst	-	-	4
Í alt	**4**	**1**	**4**

Í 2022 avgreiddi Føroya Kærustovnur fýra kærur um Sjúkrahúsverkið. Allar kærurnar vórðu burturvístar, tí talan ikki var um fyrisitingarligar avgerðir fevndar av málsøkinum hjá Kærustovninum. Føroya Kærustovnur hevur heimild at viðgera kærur, ið ikki eru um heilsufakligt virksemi. Kærurnar sum vórðu móttiknar og avgreiddar í 2022 vóru kærur um viðferð í sjúkrahúsverkinum, sum viðkomandi persónar ikki vóru nøgdir við.

FAMILJUFYRISITINGIN

AVGREIÐSLAN AV MÁLUM HJÁ FAMILJUFYRISITINGINI

	2020	2021	2022
Staðfest	14	14	9
Heimvíst	1	1	1
Burturfallin	1	1	2
Uppafturtøku	1	-	-
Annað	2	-	-
Í alt	**17**	**16**	**12**

Føroya Kærustovnur avgreiddi í 2022 tilsamans 12 kærur um avgerðir frá Familjufyrisitingini. Níggju avgerðir vórðu staðfestar og ein varð heimvíst. Tvær kærur fullu burtur.

Familjufyrisitingin tekur avgerðir eftir lóg um foreldramyndugleika og samveru, lóg um rættarstøðu barnanna, hjúnabandslógini og verjumálslógini.

Avgreiddar vórðu fimm kærur um avgerðir eftir lóg um rættarstøðu barnanna. Ein kæra fall burtur tí Familjufyrisitingin tók nýggja avgerð í málinum. Fýra avgerðir vórðu staðfestar og vóru allar viðvíkjandi ásetan av barnagjaldi.

Kærustovnurin avgreiddi fýra kærur um avgerðir eftir lóg um foreldramyndugleika og samveru, harav tvær teirra vórðu staðfestar og ein heimvíst. Ein kæra fall burtur, tí kærarin tók kæruna aftur. Ein kæra varð heimvíst til nýggja viðgerð hjá Familjufyrisitingini, tí Kærustovnurin metti ikki, at málið var nøktandi upplýst og at tørvur var á fleiri kanningum fyri at tryggja eitt nøktandi grundarlag at taka avgerð um, hvørt samvera ella annað samband við foreldri er til barnsins besta.

Tvær kærur um avgerðir eftir verjumálslógini vórðu avgreiddar og vórðu báðar avgerðirnar staðfestar. Ein teirra var kæra um samsýning til fastan verja, ið var tilnevndur sum serligur verji í sambandi við búðviðgerð, og var ein kæra um avgerð hjá Familjufyrisitingini at sýta einum verja at endurrinda viðkomandi útgjald fyri útreiðslur, sum viðkomandi hevði havt fyri ein, ið var undir verjumáli.

Kærustovnurin viðgjørdi eina kæru um innlit, har Familjufyrisitingin hevði sýtt kæraranum innlit í skjøl í verjumáli hjá foreldri kærarans, frá tíðini eftir at avgerð varð tikin um at seta í verk verjumál hjá foreldrinum. Kærustovnurin staðfesti avgerðina hjá Familjufyrisitingini, tí kærarin ikki varð mettur at vera partur í eftirfylgjandi viðgerðini av málinum, tá avgerð varð tikin um at seta í verk verjumál og verji varð settur.

VIÐGERÐARTÍÐIN

Miðal viðgerðartíðin í 2022 var beint yvir 4 mánaðir.

Í 2019, 2020 og 2021 var miðal viðgerðartíðin beint undir 5 mánaðir, og í 2018 og 2017 var miðal viðgerðartíðin knappar 4 mánaðir. Viðgerðartíðin hevur sostatt verið áleið á sama støði seinastu 6 árini.

Viðgerðartíðin verður roknað frá tí at kæra er móttikin á Føroya Kærustovni, til kæran er avgreidd á fundi í setta Kærustovninum ella av stjóranum ella løgfrøðingi á Føroya Kærustovni. Íroknað viðgerðartíðini er sostatt tíðin sum fer til at fáa ummælið frá viðkomandi myndugleika, at partshoyra og innheinta møguligar supplerandi upplýsingar.

Strembað verður altíð eftir, at viðgerðartíðin er so stutt sum gjørligt. Havandi omanfyrinevndu viðurskifti í huga verður miðal viðgerðartíðin fyri almanna-, familju- og heilsumál mett nøktandi.

SERLIGA ÁHUGAVERD MÁL

Dagpeningur – sóttarhald lógligt forfall

Mál nr. 21/08174

Almannaverkið sýtti umsókn kærarans um dagpening vísandi til, at kærarin ikki leyk treytina sum ásett er í § 7, stk. 1, í dagpeningalógini, um at hava verið í løntum arbeiði í minst 120 tímar tilsamans seinastu 13 vikurnar undan sjúkrafráveruni.

Upplýst varð í málinum, at kærarin var 16 ára gamal og søkti um dagpening, tí hann hevði fingið staðfest korona.

Upplýst varð, at kærarin hevði verið nógv burtur frá arbeiðinum í oktober, november og desember orsakað av sóttarhaldi, og at hetta var orsøkin til, at kærarin ikki hevði megnað at arbeitt í 120 tímar seinastu 13 vikurnar undan sjúkrafráveruna. Víst varð á, at um hugt varð eftir arbeiðstímunum í august sást, hvussu nógv kærarin arbeiddi, tá hann ikki var í sóttarhaldi.

Føroya Kærustovnur vísti á, at útgangsstøðið er, at ein skal hava verið í løntum starvi í minst 120 tímar tilsamans seinastu 13 vikurnar undan sjúkrafráveruna fyri at fáa rætt til dagpening, sbrt. § 7, stk. 1 í dagpeningalógini.

Sambært hjáløgdu lønarseðlunum sást, at kærarin hevði arbeitt undir 120 tímar seinastu 13 vikurnar undan fráveruni, og hevði tí ikki rætt til dagpening sbrt. § 7, stk. 1.

Undantak kann tó gerast frá útgangsstøðinum í § 7, stk. 1. Sambært § 7, stk. 2 verða seinastu 5 arbeiðsvikurnar hjá persóninum nýttar sum grundarlag ístaðin, um persónurin hevur verið burtur frá arbeiði orsakað av lógligum forfalli.

Sambært serligu viðmerkingunum til § 7, stk. 2, sí løgtingsmál nr. 50/2000, er henda undantaksregla ætlað teimum førunum, har ein persónur innan seinastu 5 vikurnar hevur verið burtur frá arbeiði orsakað av lógligum forfalli, sum t.d. vanligari frítíð, sjúkum barni, álvarsligari sjúkum familjulimi, verkfalli og líknandi, og tískil ikki lýkur treytirnar í § 7, stk. 1. Tá verður ístaðin hugt at tilknýtinum til arbeiðsmarknaðin tær seinastu 5 arbeiðsvikurnar, og kunnu hesar vera í einum samanhangandi ella í einum brotnum tíðarskeiði.

Vísandi til at tað av heilsumyndugleikunum um tað mundi varð mælt til, at man fór í sóttarhald, um man hevði verið í samband við persón, ið hevði covid-19, og at kærarin við at fara í sóttarhald hevði fylgt tilmælinum frá heilsumyndugleikunum, metti Føroya Kærustovnur, at sóttarhald var at meta sum lógligt forfall, og at seinastu 5 arbeiðsvikur kærarans tískil áttu at verið nýttar sum grundarlag heldur enn seinastu 13 vikurnar undan sjúkrafráveruni.

Føroya Kærustovnur avgjørdi at heimvísa avgerðina hjá Almannaverkinum fyri at fáa greiðu á, hvussu nógv kærarin hevur arbeitt seinastu 5 arbeiðsvikurnar.

Avgerðin varð grundað á, at sóttarhald varð mett at vera lógligt forfall, og at seinastu 5 arbeiðsvikur kærarans áttu at verið nýttar sum grundarlag heldur enn seinastu 13 vikurnar undan sjúkrafráveruni, sbrt. § 7, stk. 2, smb. § 7, stk. 1 í dagpeningalógini.

Sýtt umsókn um fyribils uppihaldsveiting vegna peningaogn

Mál nr. 22/11518

Almannaverkið hevði sýtt umsókn kærarans um fyribils uppihaldsveiting vegna vantandi barnaansing við teirri grundgeving, at kærarin um umsóknarmundið átti peningaogn, sum ikki kom undir undantøkini í § 20, stk. 4, nr. 1-3 í lóg um almannatrygd og tænastur.

Upplýst varð millum annað í málinum, at innistandani ogn var uppsparing, ið var ætlað til m.a. sethúsabygging og at peningurin sambært kæraranum ikki var tøkur.
Føroya Kærustovnur vísti á, at sambært § 11, stk. 1, í lóg um almannatrygd og tænastur kann persónur, sum orsakað av sjúku, viðgongu og føðing, samlívssliti, vantandi arbeiðsmøguleikum ella øðrum broytingum í sínum viðurskiftum og sum í avmarkað tíðarskeið ikki megnar at uppihalda sær og síni familju, fáa fyribils uppihaldsveiting, um almannahendingin hevur við sær, at liviumstøðurnar munandi versna.

Sambært § 11, stk. 3, nr. 4, skal persónurin ikki megna at svara hvørjum sítt við øðrum inntøkum, og allir arbeiðsmøguleikar skulu vera troyttir soleiðis, at persónur, ið hevur uppihaldsskyldu mótvegis barni, ikki kann arbeiða vegna vantandi barnaansing.

Kærustovnurin vísti á, at ásett er í § 20, stk. 1, í lóg um almannatrygd og tænastur, at fyribils uppihaldsveiting sambært § 11, stk. 1, í somu lóg, ikki kann veitast, um persónurin ella hjúnfelagi eiga ogn, sum kann nýtast til uppihald.

Ásett er í § 20, stk. 2, í lóg um almannatrygd og tænastur, at hóast ásetingina í stk. 1 verður sæð burtur frá tøkum peningi til og við 30.000 kr.

Sambært § 20, stk. 3, er at meta sum ogn sbrt. stk. 1 til dømis reiður peningur, innistandandi, virðisbrøv, útgoldin eftirlønaruppsparing og ognir umframt egin bústaður, so sum sethús, summarhús og aðrar fastognir, umframt kostnaðarmikið innbúgv.

Ásett er í § 20, stk. 4, at sum ogn er ikki at meta 1) ogn vegna endurgjald fyri varandi mein og ikki fíggjarligan skaða, 2) skaðabót vegna hættisliga sjúku ella skaða upp til kr. 150.000, ið verður útgoldin í einum, og 3) ogn frá eftirgjaldi av almannaveitingum, í tvey ár eftir, at eftirgjaldið er útgoldið.

Kærustovnurin staðfesti, at kærarin ikki leyk treytirnar fyri at fáa fyribils uppihaldsveiting, og grundarlag sást ikki vera fyri at seta til síðis avgerðina hjá Almannaverkinum.

Kærustovnurin vísti á, at undantøkini um ogn vórðu broytt og herd við nýggju almannalógini. Eftir forsorgarlógini kundi man síggja burtur frá minni ogn, m.a. ætlað til bústað. Hetta undantakið varð tikið burtur, og varð sum nakað nýtt ásett, at sæð verður burtur frá tøkum peningi upp til kr. 30.000.

Kærarin hevði sostatt ikki lokið treytirnar fyri at fáa fyribils uppihaldsveiting, hóast peningaognin hevði staðið á bústaðarkontuni á umsóknardegnum.

5/SKATTA- OG AVGJALDSMÁL

Tann 1. januar 2022 varð Skatta- og avgjaldskærunevndin avtikin og økið flutt til Føroya Kærustovn.

Hetta hevur millum annað havt við sær, at kæra send kærunevndini, sum ikki varð avgreidd áðrenn 1. januar 2022, er viðgjørd og avgreidd av Føroya Kærustovni.

VIÐGERÐARØKIÐ

Føroya Kærustovnur viðger kærur um:

- Avgerðir hjá TAKS um skatt, skattaálíkning, toll, meirvirðisgjald og bindandi svar.
  Harafturat avgerðir hjá TAKS sambært eftirlønarlógini, lógini um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn, o.l.
- Avgerðir hjá Akstovuni um avgjald við skrásetingargjald á motorakførum.

Harafturat er ásett í nýggju skattafyrisitingarlógini[1], at tá ið hetta valskeiðið er lokið hjá kommununum, verða tær kommunalu skattakærunevndirnar endaliga tiknar av. Økini hjá teimum kommunalu skattakærunevndunum varð við kunngerðini av nýggju lógini tann 2. mai 2022 flutt til Føroya Kærustovn.

Sambært § 21 í skattafyrisitingarlógini viðgera tær kommunalu skattakærunevndirnar tær kærur, sum eru latnar inn áðrenn kunngerðardagin, og Føroya Kærustovnur viðger kærur, ið eru latnar inn eftir kunngerðardagin.

NÝGGJ MÁL

Í 2022 eru 40 kærur latnar Føroya Kærustovni um skatta- og avgjaldsmál. Millum móttiknu málini í 2022 er ikki nakað ávíst øki, har serliga nógvar kærur eru móttiknar. Tær innkomnu kærurnar eru javnt deildar á ymisku økini undir skatta- og avgjaldsmálum, har tó ein lítil meiriluti av kærunum eru á økjunum um skatt, meirvirðisgjald og kapitalvinning.

Tær 40 móttiknu kærurnar í 2022 eru nakað væl fleiri enn 2021, men ájavnt talið av móttiknum kærum í 2020 og 2019. Talið av málum á skatta- og avgjaldsøkinum kann vera skiftandi gjøgnum árini, tá ávís ár stundum hava stóra øking av málum á serligum økjum, sum t.d. FAS skipanin í 2019 og eftirlønarlógin í 2020, og í 2022 er nakað fleiri av kærum um skatt og álíkning, eitt nú orsakað av at økini, sum hoyrdu til Kommunalu Skattakærunevndirnar, í mai 2022 vórðu flutt til Føroya Kærustovn.

Trupult er annars sum heild at siga, hvørjar orsøkir eru til økingarnar á ymsu økjunum, men talan kann t.d. vera um lógarbroytingar á økjunum, nýggja siðvenju hjá myndugleikunum ella broytingar í samfelagsviðurskiftum annars, sum hava við sær økingar í talinum av kærum á ávísum øki innan skatta- og avgjaldsøkið.



[1] Løgtingslóg nr. 61 um fyrisiting av skatti, tolli og avgjaldi 2. mai 2022

AVGREIDD MÁL

Føroya Kærustovnur avgreiddi í alt 39 kærur um avgerðir innan skatta- og avgjaldsmál. Hetta er á leið tað sama sum 2021. Av hesum vóru 3, sum vórðu afturkallaðar og 5 sum fullu burtur, áðrenn Kærustovnurin tók støðu til teirra. 5 kærur vórðu avgreiddar av stjóranum ella løgfrøðingi á Føroya Kærustovni sambært § 4 í lóg um Føroya Kærustovn. Í 2 førum varð Føroya Kærustovnur settur við stjóranum og tveimum løgfrøðingum, umframt einum serkønum, sum í báðum førum var serkønur við serligum kunnleika til roknskaparviðurskifti. 24 av kærunum vórðu avgreiddar av stjóranum og tveimum løgfrøðingum á Kærustovninum.



BÝTIÐ AV AVGREIDDUM MÁLUM

	2020	2021	2022
Skattur	9	0	13
Meirvirðisgjald	5	8	5
Skrásetingargjald á motorakførum	0	2	1
Tollur og onnur avgjøld	3	5	6
Kærufreist, uppafturtøka v.m.	4	5	3
Annað (m.a. eftirløn, AMEG o.a.)	7	19	6
Kapitalvinningur (m.a. armslongd § 37a)	1	5	5
Í alt	**29**	**44**	**39**

Býtið millum evnini skiftir nakað hvørt ár, og sama er fyri 2022.

Í 2022 eru avgreiddar 13 kærur um skatt, 5 um meirvirðisgjald, 6 um toll og onnur avgjøld og 7 um eftirløn, arbeiðsmarknaðareftirløn o.s.fr.

Býtið av avgreiddum málum í 2022 er nakað ólíkt 2021, eitt nú vóru sera nógv mál um eftirløn í 2021 í mun til 2022, meðan tað í 2022 eru nógv fleiri kærumál um vanliga skattseting í mun til 2021, tá tað ikki var nakað mál um vanliga skattseting. Orsøkirnar til tað kunnu vera fleiri, men ein av orsøkunum til hækkaða talið av kærum um vanligan skatt er helst, at í mai 2022 vórðu økir flutt frá teimum kommunalu skattakærunevndunum til Føroya Kærustovn.

AVGREIÐSLAN

	2020	2021	2022
Staðfest	15	27	19
Burturvíst	3	2	3
Afturvíst	1	6	3
Burturfallin	3	3	5
Afturkallað	0	2	2
Uppafturtøka	0	1	1
Kærufreist	2	3	2
Broytt	3	0	3
Partvís broytt	2	0	1
Í alt	**29**	**44**	**39**

Um hugt verður eftir samlaðu avgreiðsluni hjá Føroya Kærustovni av skatta- og avgjaldskærumálum, so sæst, at 19 av teimum 39 kærumálunum eru staðfest av Føroya Kærustovni. Tað er sostatt á leið helvtin av málunum, ið eru staðfest, og er hetta í tráð við undanfarin ár.

TAKS

AVGREIÐSLAN AV MÁLUM HJÁ TAKS

	2020	2021	2022
Staðfest	15	26	18
Broytt	2	0	1
Partvís broytt	0	0	1
Afturvíst	1	5	2
Burturfallin	3	3	6
Burturvíst	3	2	3
Afturkallað	0	2	2
Kærufreist	1	3	2
Annað	0	1	1
Í alt	**25**	**42**	**36**

Av teimum 39 kærunum, ið eru avgreiddar í 2022, eru 36 kærur um avgerðir hjá TAKS. Størsti parturin av avgerðunum hjá TAKS eru staðfestar, tvær eru afturvístar og ein er broytt.

AKSTOVAN

Føroya Kærustovnur avgreiddi eina kæru um avgerð hjá Akstovuni í 2022, sum varð staðfest.

KOMMUNALU SKATTAKÆRUNEVNDIRNAR

Føroya Kærustovnur avgreiddi tvær kærur um avgerðir hjá kommunalu skattakærunevndunum sum báðar vórðu broyttar.

VIÐGERÐARTÍÐIN

Miðal málsviðgerðartíðin í 2022 var á leið 4 mánaðir og er hetta styttri enn viðgerðartíðin undanfarin ár.

Viðgerðartíðin fevnir um alla málsgongdina, eisini tilgongdina, ið myndugleikar og partar í málinum upplýsa málið. Hetta kann vera ein drúgv tilgongd, og tí kunnu tað vera nógvar ymiskar orsøkir til, at viðgerðin av einstøkum málum gerst longri. Málsviðgerðartíðin fyri 2022 verður mett at vera á einum sera góðum støði fyri hetta slagið av málum, ið ofta eru sera trupul og umfatandi.

SERLIGA ÁHUGAVERD MÁL

Vinningur frá sølu av veiðirættindum

Mál nr. 22/09158

Føroya Kærustovnur hevði mál til viðgerðar, har kært var um, at TAKS hevði tikið avgerð um at broyta skattskyldugu inntøkuna hjá felagnum vísandi til vinning frá sølu av veiðirættindum frá kr. 0 til kr. 11.695.500,78, og harvið skuldi felagið rinda kr. 5.847.750,39 í skatti.

TAKS vísti á, at kærarin hevði fingið tillutað veiðirættindini fyri kr. 0 frá landinum, og var útveganarvirðið sostatt kr. 0.

Kærarin var ósamdur við TAKS í, at vinningurin av søluni var 11.695.500,78, men helt í staðin, at felagið hevði prógvað, at útveganarvirðið var kr. 25.500.000. Kærarin vísti á, at táið felagið hevði skift eigarar, vóru partabrøvini í felagnum keypt fyri kr. 26.507.943 og einastu virðini í felagnum vóru veiði- og fiskirættindi. Harafturat hevði móðurfelagið útvega eina meting av virðinum á fiskirættindunum frá óheftum metingarmanni, sum metti fiskirættindi til at hava eitt virði á 25 – 26 mió. kr., og metti móðurfelagið tí, at útveganarvirðið av veiðirættindunum varð skjalprógvað sambært § 4, stk. 5 í lógini um skatting av vinningi frá sølu av veiðirættindum at vera 25,5 mió. kr. Víst var á, at hóast kærarin var formelli eigarin av veiðirættindunum, var tað í veruleikanum móðurfelagið, ið átti tey, og átti útveganarvirðið á veiðirættindunum tí at setast til 25,5 mió.kr.

Føroya Kærustovnur avgjørdi at staðfesta avgerðina hjá TAKS vísandi til, at hóast øll partabrøvini í felagnum (kæraranum) vórðu keypt av móðurfelagnum í 2014, er tað kærarin, ið er formelli eigari av veiðirættindum, ið sambært keypssáttmálanum hevur selt veiðirættindini. Samanumtikið varð mett, at kærarin hevði ikki sambært § 4, stk. 5 í lógini um skatting av vinningi frá sølu av veiðirættindum, skjalprógvað, at útveganarvirðið av veiðirættindunum var 25,5 mió. kr., og skuldi tað tí setast til kr. 0, og skuldi kærarin harvið rinda skatt av vinninginum sambært § 4, stk. 2.

Sýtt undantøku at rinda til føroyska eftirlønarskipan

Mál nr. 22/14472

Føroya Kærustovnur hevði mál til viðgerðar, har kært var um, at TAKS hevði tikið avgerð um at sýta undantøku at rinda til føroyska eftirlønarskipan.

Kærarin var ósamdur við TAKS um, at kærarin ikki lýkur treytirnar at vera frítikin at rinda til føroyska eftirlønarskipan, tí hóast hann býr og arbeiðir í Føroyum, so arbeiðir hann fyri ein útlendskan arbeiðsgevara yvir alnetið, og heldur, at tað er ikki ein treyt sambært lógini, at arbeiðið skal vera fysiskt útint uttanfyri Føroyar.

Føroya Kærustovnur avgjørdi at staðfesta avgerðina hjá TAKS. Avgerðin varð grundað á, at kærarin uppfylti ikki treytirnar fyri undantøku sambært § 3, nr. 18 í eftirlønarlógini og § 1, stk. 1, í kunngerð um undantak, ið ásetur sum treyt fyri undantøku, at inntøkan er forvunnin uttanlands. Føroya Kærustovnur vísti eisini á, at í viðmerkingunum til § 3, nr. 18 í løgtingsmáli nr. 70/2020 er viðmerkt, at inntøka sum er forvunnin í Føroyum er ikki frítikin.

6/LESTRARSTUÐULSMÁL

Tann 1. januar 2022 varð kærunevndin hjá Studna avtikin, og økið flutt til Føroya Kærustovn, sbrt. § 16, stk. 1 í løgtingslógini um Føroya Kærustovn.

VIÐGERÐARØKIÐ

Føroya Kærustovnur viðger kærur um avgerðir hjá Studna eftir løgtingslóg nr. 36 frá 3. mai 2007 um lestrarstuðul.

MÓTTIKIN MÁL

Talið av kærum í lestrarstuðulsmálum er vanliga ikki serliga høgt, men í 2022 var als ongin kæra á hesum øki. Hetta er óvanligt, men ilt hjá Kærustovninum at meta um, hvør orsøkin til hetta er.



AVGREIDD MÁL

Kærustovnurin hevði 2 fundir um lestrarstuðulsmál í 2022 og avgreiddi 2 mál. Bæði málini vóru innkomin árið frammanundan. Í 2020 vórðu 9 mál avgreidd, ímeðan 6 mál vórðu avgreidd í 2021.



AVGREIÐSLAN

Av teimum 2 málunum, sum vórðu avgreidd hetta árið, varð 1 mál staðfest, og í hinum málinum, sum var ein umbøn um uppafturtøku, varð uppafturtøka noktað.



BÝTIÐ AV AVGREIDDUM MÁLUM

	2020	2021	2022
Ferðastuðul til lesandi uttanlands	2	2	0
Lestrarstuðul í Føroyum	6	4	2
Lestrarstuðul uttanfyri Føroyar	1	0	0
Lestrarstuðul uttanfyri norðurlond	0	0	0
Í alt	**9**	**6**	**2**

VIÐGERÐARTÍÐIN

Í 2022 var miðal viðgerðartíðin í lestrarstuðulsmálum knappar 3 mánaðir. Viðgerðartíðin er sostatt farin niður sammett við undanfarna árið, har hon var knappar 4 mánaðir.

Ein miðal viðgerðartíð á 3 mánaðir er stutt tíð, tá hugsað verður um, at viðgerðartíðin verður roknað, frá kæran er innkomin á Kærustovnin, til hon er avgreidd á fundi. Tað vil siga, at tíðin, sum fer til ummælis, hoyring og innheintan av upplýsingum annars eisini er partur av viðgerðartíðini.

SERLIGA ÁHUGAVERD MÁL

Sýtt vistarhaldsstuðul

Mál nr. 21/22699

Í málinum varð kært um, at Studni hevði sýtt kæraranum vistarhaldsstuðul. Umsóknin varð ikki gingin á møti, tí vistarhaldsstuðul, sambært § 7, stk. 2 í kunngerð um lestrarstuðul, bert verður veittur, um fjarstøða millum heimstaðarbýin/bygdina og skúlabýin/bygdina er longri enn 35 km, sambært almennu ásetingunum hjá Landsverki. Í hesum føri var talan um eina fjarstøðu uppá 34,79 km.

Kærarin upplýsti, at kærarin gekk í skúla á Glasi. Snarbussurin, sum koyrdi styttri leiðina til heimstaðin (34,79 km), koyrdi úr Tórshavn seinasta túr kl. 16.15 gerandisdagar og koyrdi ikki í vikuskiftinum. Útbúgvingin hjá kæraranum var soleiðis háttað, at kærarin ikki altíð kundi taka heimaarbeiði við heim, og mátti ofta verða á skúlanum fyri at gera verkætlanir. Kærarin náddi tí ikki Snarbussin kl. 16.15 og mátti taka ta longru leiðina (70 km) heim gerandisdagar og báðar vegir í vikuskiftinum.

Føroya Kærustovnur viðmerkti, at hóast tað kundi tykjast óheppið, at Snarbussurin koyrdi seinasta túr kl. 16.15 gerandisdagar og ikki koyrdi í vikuskiftinum, so var støðan tann, at bussamband var tøkt. Føroya Kærustovnur metti tí ikki, at støða kærarans var nóg mikið til at staðfesta, at talan var um eitt serligt føri, sum eftir § 7, stk. 3 í kunngerð um lestrarstuðul kundi grunda undantak frá regluni í § 7, stk. 2.

7/LENDISMÁL

Tann 1. juli 2022 varð Kærunevndin í lendismálum avtikin og virkisøkið flutt til Føroya Kærustovn. Hetta merkir sostatt, at árið 2022 hevur verið tvíbýtt. Fyrra hálvárið 2022 hevur Kærunevndin í lendismálum verið virkin, meðan virkisøkið hjá Kærunevndini í lendismálum seinna hálvárið 2022, hevur ligið hjá Føroya Kærustovni.

KÆRUNEVNDIN Í LENDISMÁLUM

Fyrra hálvárið í 2022, varð Kærunevndin í lendismálum samansett av trimum limum, tá hon skuldi taka støðu til einstøk kærumál. Nevndin varð mannað við formanninum og tveimum limum við serkunnleika á viðkomandi øki.

- Elsa Østergaard, løgfrøðingur og forkvinna í nevndini
- Bárður Dam í Baiansstovu, arkitektur
- Óla Jákup Guttesen, byggimeistari

VIÐGERÐAREØKIÐ

Kærunevndin í lendismálum viðger kærur um:

- Avgerðir hjá kommununum eftir býarskipanarlógini ella byggisamtykt.
- Avgerðir hjá kommununum eftir 1881-lógini um ognartøku.
- Avgerðir hjá Umhvørvisstovuni eftir lóg um matrikulering og sundurbýti.
- Avgerðir hjá Umhvørvisstovuni eftir lóg um tinglýsing.
- Avgerðir eftir lógini um eigaraíbúðir.
- Avgerðir eftir lógini um bygging.

NÝGGJ MÁL

Í 2022 vóru 25 kærur móttiknar. Hetta er á leið tað sama sum í 2021, men meira enn tvífalt so nógvar sum í 2020.

Eins og undanfarin ár vórðu flestu kærurnar um bygging. 12 av kærunum snúðu seg um bygging, 9 um matrikulering og sundurbýti, 1 um tinglýsing og 3 um viðurskifti, sum fella uttan fyri virkisøkið hjá ávikavist Kærunevndini í lendismálum og Kærustovninum.



AVGREIDD MÁL

Kærunevndin í lendismálum hevði fyrra hálvárið 4 fundir og avgreiddi 16 mál.

Kærustovnurin avgreiddi seinnu hálvu av árinum 12 mál. Av hesum varð 1 avgreitt av løgfrøðingi á Føroya Kærustovni sambært § 4 í lóg um Føroya Kærustovn. 1 mál varð avgreitt av stjóranum, tveimum løgfrøðingum og einum serkønum og 1 mál varð avgreitt av stjóranum, tveimum løgfrøðingum og tveimum serkønum. Í báðum førum, har serkøn vóru við í viðgerðini, var talan um byggimál, har byggikøn vórðu mett neyðug fyri viðgerðina. 9 mál vórðu avgreidd av stjóranum og tveimum løgfrøðingum.

Í alt 28 mál vóru soleiðis avgreidd í 2022, sum eru nakað meira enn undanfarnað ár, tá 24 mál vórðu avgreidd. Í 2020 vórðu 18 mál avgreidd.

Sum vant vóru flestu avgreiddu málini um bygging og vóru tey 14 í tali hetta árið. Harumframt vóru 7 mál um matrikulering og sundurbýti, 1 mál um ognartøku og 6 mál vóru um annað, sum fellur uttan fyri virkisøkið hjá ávikavist Kærunevndini í lendismálum og Kærustovninum.

BÝTIÐ AV AVGREIDDUM MÁLUM

	2020	2021	2022
Byggimál	10	14	10
Matrikulering/sundurbýti	2	6	7
Tinglýsing	1	0	0
Ognartøka	2	2	1
Annað	3	2	6
Í alt	**18**	**24**	**28**



AVGREIÐSLAN

	2020	2021	2022
Staðfest	8	11	9
Broytt	0	2	4
Afturvíst til nýggja viðgerð	1	2	3
Burturvíst	3	5	8
Burturfallin	1	1	0
Steðgandi virknað	2	2	3
Kæra afturkallað	2	0	0
Uppafturtøku	3	2	0
Kærufreist	0	0	1
Í alt	**18**	**24**	**28**



VIÐGERÐARTÍÐIN

Miðal viðgerðartíðin í 2022 var góðar 5 mánaðir. Hetta er sama viðgerðartíð sum undanfarna ár. Í 2020 var viðgerðartíðin 5½ mánaðir. Ein miðal viðgerðartíð á 5 mánaðir má metast góð fyri hetta slag av málum. Í hesum sambandi skal havast í huga, at viðgerðartíðin verður roknað frá tí degi, málið er innkomið til Kærustovnin, til tað er avgreitt á fundi, og sostatt skulu atlit m.a. takast til krøvini til málsupplýsing og partshoyring.

SERLIGA ÁHUGAVERD MÁL

Sýtt byggiloyvi

Mál nr. 21/27281

Kært varð um sýtt byggiloyvi til sethús. Kommunan sýtti byggiloyvi, tí húsini skuldu venda ein ávísan veg.

Kærunevndin í lendismálum broytti avgerðina hjá kommununi. Kærunevndin var av teirri fatan, at tá avgerðin hjá kommununi, um at húsini í útstykkingini skulu venda eystur og vestur, bert var tikin á vanligum bygdaráðsfundi hjá kommununi, og ongi stig eftirfylgjandi vórðu tikin til at gera broytingar samsvarandi hesum í byggisamtyktini, ella til at lýsa eina serstaka byggisamtykt, varð mett, vísandi til § 10, stk. 2 í býarskipanarlógini, at kærarin hevði krav uppá at fáa tað byggiloyvið, sum søkt var um í hesum føri.

Vegatkomurættur

Mál nr. 21/27281

Kært varð um, at Umhvørvisstovan hevði sýtt at strika ein vegatkomurætt á matr. nr. A.

Avgerðin var m.a. grundað á, at kommunan í ummæli sínum hevði víst á, at verandi atkoma til trøðna matr. nr. B, var eftir atkomurættinum á matr.nr. A, og yvirum matr.nr. D, sum er atkomuvegur, sum kommunan átti. Ongar ætlanir vóru um at broyta atkomurættin til matr.nr. B, eftir matr.nr. D, og kommunan mælti tí frá, at atkomurætturin varð strikaður. Eigarin av matr.nr. B mótmælti somuleiðis, at atkomurætturin varð strikaður. Umhvørvisstovan vísti eisini á, at hetta var einasti faktiski atkomurætturin til trøðna. Skuldi atkomurætturin strikast var neyðugt, at eigarin av matr.nr. B, sum brúkar atkomuna, góðtók hetta, eins og at kommunan skrásetti ein nýggjan atkomu rætt á C. Hvørgin var sinnaður til hetta.

Føroya Kærustovnur avgjørdi at staðfesta avgerðina hjá Umhvørvisstovuni.

8/VINNUMÁL

Tann 1. juli 2022 varð Vinnukærunevndin avtikin og virkisøkið flutt til Føroya Kærustovn. Hetta merkir sostatt, at árið 2022 á vinnuøkinum, hevur verið tvíbýtt. Fyrra hálvárið 2022 hevur Vinnukærunevndin verið virkin, meðan virkisøkið hjá Vinnukærunevndini seinna hálvárið 2022, hevur ligið hjá Føroya Kærustovni.

NEVNDIN

Fyrra hálvárið í 2022, varð Vinnukærunevndin samansett av trimum ella fimm limum, tá hon skuldi taka støðu til einstøk kærumál. Nevndin varð mannað við formanninum ella næstformanninum og tveimum ella fýra limum við serkunnleika á viðkomandi øki.

- Marjun Magnussen,
  løgfrøðingur og forkvinna í nevndini
- Jóhan Jógvansson Lamhauge,
  løgfrøðingur og næstformaður í nevndini

VIÐGERÐARØKIÐ

Í vinnumálum viðger Føroya Kærustovnur kærur um:

- Avgerðir hjá Akstovuni eftir ferðslulógini
- Avgerðir hjá Arbeiðseftirlitinum eftir lóg um arbeiðsumhvørvi, lóg um kavaravinnu og kavaraútgerð og lóg um spreingievni og spreingiarbeiði v.m.
- Avgerðir hjá Umhvørvisstovuni eftir lóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni, og eftir kunngerð um vápnaprógv
- Avgerðir hjá Fjarskiftiseftirlitinum eftir lóg um fjarskifti
- Avgerðir hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni eftir lóg um matvørur v.m., lóg um aling av fiski, lóg um djórasjúkur, lóg um djóralæknavirksemi og lóg um innflutning og hald av vandamiklum djórum o.ø.
- Avgerðir hjá Kappingarráðnum eftir lóg um kapping og anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om betalinger
- Avgerðir hjá Landsverk eftir lóg um landsvegir og lóg um ognartøku og avhendan til flogferðsluendamálflogferðsluendamál
- Avgerðir hjá Posteftirlitinum eftir lóg um postvirksemi
- Avgerðir hjá Skráseting Føroya eftir partafelagslógini, smápartafelagslógini, ársroknskaparlógini, lóg um ávís vinnurekandi virkir, lóg um vinnurekandi grunnar, lóg um vinnu, lóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðaravirkir, og lóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (Hvítvasklógin)
- Avgerðir hjá Sjóvinnustýrinum eftir kunngerð um loðsprógv og loðsfrítøkuskjal
- Avgerðir hjá Tryggingareftirlitinum eftir lóg um tryggingarvirksemi og lóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (Hvítvasklógin)
- Avgerðir hjá Umhvørvisstovuni eftir kunngerð um vápnaprógv
- Harumframt viðger Føroya Kærustovnur kærur eftir lóg um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftinum

NÝGGJ MÁL

Í 2022 eru 16 kærur um vinnukmál móttiknar. Hetta er nakað væl færri enn í 2021 og 2020, tá 25 kærur vórðu móttiknar.

Flestu móttiknu kærurnar hetta árið eru um avgerðir hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og eru tær 6 í tali. Afturat teimum komu 3 kærur inn um avgerðir hjá Umhvørvisstovuni, 2 kærur um avgerðir hjá Tryggingareftirlitinum, 2 mál um avgerðir hjá Landsverki, 1 kæra um avgerðir hjá Akstovuni, 1 mál um setanarprógv og 1 kæra sum snúði seg um annað.

Býtið av kærum á málsøkir er rættiliga líkt undanfarnum árum, har tað eru móttiknar flestar kærur um avgerðir hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Í ár eru tær 6 móttiknu kærurnar um avgerðir hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni tó bert helmingurin av teimum 12, sum vórðu móttiknar í 2021. Hendan stóra minkingin umboðar eisini stóran part av samlaðu minkingini av móttiknum kærum á vinnuøkinum í 2022, har móttiknar eru 9 færri mál enn í 2021.



Heilsufrøðiliga Starvsstovan	6
Akstovan	1
Umhvørvisstovan	3
Setanarprógv	1
Trygginareftirlitið	2
Landsverk	2
Annað	1

AVGREIDD MÁL

	2020	2021	2022
Akstovan	1	3	2
Fjarskiftiseftirlitið	0	0	0
Heilsufrøðiliga Starvsstovan	13	9	9
Landsdjóralæknin	0	1	0
Landsverk	0	0	3
Setanarprógv	5	2	2
Skráseting Føroya	0	1	0
Umhvørvisstovan	4	6	5
Kappingareftirlitið	0	0	0
Annað	0	0	1
Í alt	**23**	**21**	**22**

Tiknar vórðu 22 avgerðir í 2022 og er hetta líknandi 2020 og 2021, tá ávikavist 23 og 21 avgerðir vórðu tiknar.

Kærustovnurin avgreiddi seinnu hálvu av árinum 8 mál. Av hesum vórðu 2 avgreidd av løgfrøðingi á Føroya Kærustovni sambært § 4 í lóg um Føroya Kærustovn, har annað málið varð avvísing av máli sum ikki varð fevnt av málsøkinum hjá Føroya Kærustovni og hitt málið varð eitt burturfallið mál. 5 mál vórðu avgreidd av stjóranum og tveimum løgfrøðingum. 1 mál varð avgreitt av stjóranum, tveimum løgfrøðingum og einum serkønum. Í málinum, har ein serkønur varð við í viðgerðini, var talan um mál viðvíkjandi djórasjúkulógini, har djóralækni varð mettur neyðugur fyri viðgerðina.

AVGREIÐSLAN

	2020	2021	2022
Staðfest	7	8	8
Lutvíst staðfest	0	1	1
Broytt	0	1	0
Heimvíst	3	2	1
Ógilda	0	1	1
Avvíst	5	3	4
Burturfallin	2	0	2
Afturkallað	1	0	0
Kærufreist	1	1	0
Steðgandi virknaður	1	0	2
Viðhald (setanarprógv)	1	2	1
Uppafturtøka	1	1	1
Annað	1	1	1
Í alt	**23**	**21**	**22**

AKSTOVAN

2 AVGREIDD MÁL

Vinnukærunevndin viðgjørdi í 2022 tvey mál um avgerðir hjá Akstovuni. Eina málið snúði seg um avgerð hjá Akstovuni at taka nummarspjaldur av bili. Hitt málið snúði seg um avgerð hjá Akstovuni at skerja koyrirættin hjá einum borgara. Báðar avgerðirnar hjá Akstovuni vórðu staðfestar.

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

9 AVGREIDD MÁL



Staðfest	2
Ógilda	1
Burturfallin	1
Avvíst	3
Steðgandi virknað	2

Fýra av málunum snúðu seg um ymisk viðurskifti í sambandi við alilóggávuna

Eina málið snúði seg um avgerð hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni um niðurskurð av smolti í sambandi við útsetu á aliøki. Avgerðin hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni varð ógildað, vísandi til, at avgerðin m.a. varð heft við feilum og manglum, ið høvdu havt avgerandi týdning fyri útfallið av avgerðini.

Annað mál snúði seg um avgerð hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni at taka aftur aliøki í sambandi við endurnýggjan av aliloyvi hjá alara. Avgerðin hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni varð staðfest, vísandi til, at brúksskyldan ikki varð hildin, tá alarin ikki hevði brúkt aliøkið í langa tíð.

Tvey mál vórðu avvíst av Vinnukærunevndini, har tað í eini málinum varð talan um, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan ikki hevði tikið endaliga avgerð í málinum, meðan talan í hinum málinum varð um, at kærarin ikki hevði ein týðandi og individuellan áhuga í málinum og tískil ikki hevði kærurætt.

Tvær avgerðir snúðu seg um avgerð hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni sambært djórasjúkulógini

Talan varð um sama mál, har Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevði tikið avgerð um at avlíva flogfenað sambært djórasjúkulógini. Kærarin ynskti, at kæran skuldi fáa steðgandi virknað og hesum tók Føroya Kærustovnur undir við. Seinni tók kærarin upprunaligu kæruna aftur, soleiðis at málið fall burtur.

Tvær avgerðir snúðu seg um avgerð hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni um at fiskur í aliøki skuldi avtakast og aliøkið skuldi ruddast

Málið snúði seg um, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevði tikið avgerð um, at fiskur í aliøkið skuldi takast av og aliøkið skuldi ruddast, vísandi til, at tað er forboðið at ala á vøtnum og í byrgingum. Kærarin ynskti, at kæran skuldi hava steðgandi virknað við sær og hesum tók Vinnukærunevndin undir við. Vinnukærunevndin staðfesti avgerðina hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni at rudda aliøkið.

Eina málið snúði seg um málsræði hjá Vinnukærunevndini at viðgera avgerð hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni sambært matvørulógini

Málið snúði seg um, hvørt eini boð frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni til matvøruframleiðara, givin til tess at tryggja, at krøv sambært matvørulóggávuni vórðu hildin, varð ein fyrisitingarlig avgerð, sum kundi kærast til Vinnukærunevndina. Vinnukærunevndin avvísti kæruna, vísandi til, at avgerðin hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni ikki varð ein fyrisitingarlig avgerð, sum kundi kærast til Vinnukærunevndina.

UMHVØRVISSTOVAN

5 AVGREIDD MÁL



Staðfest	3
Uppafturtøka	1
Málsræði	1

Allar 5 avgerðirnar snúðu seg um viðurskifti í sambandi við elveitingarøkið

Eina málið snúði seg um kæru um avgerð hjá Umhvørvisstovuni at lýsa eftir umsøkjarum til loyvi til elframleiðslu úr vindorku. Vinnukærunevndin avgjørdi at staðfesta avgerðina hjá Umhvørvisstovuni at lýsa eftir umsóknum til loyvi til elframleiðslu úr vindorku.

Annað mál snúði seg um kæru um avgerð hjá Umhvørvisstovuni at nokta umsøkjara loyvi til elframleiðslu úr vindorku á tveimum ymiskum staðsetingum í Føroyum. Vinnukærunevndin staðfesti avgerðina hjá Umhvørvisstovuni, vísandi m.a. til, at mett varð ikki, at grundarlag varð fyri, at seta til viks metingina hjá Umhvørvisstovuni av umsøkjarunum.

Seinastu 3 avgerðirnar høvdu allar tilknýti til sama mál, sum snúði seg um avgerð hjá Umhvørvisstovuni um ikki at taka uppaftur avgerð um prísavtalu á elveitingarøkinum til nýggja viðgerð. Fyrst tók Vinnukærunevndin eina avgerð í mun til hvørjir lutir í kæruni vórðu at meta sum kærur um fyrisitingarligar avgerðir, sum kundu kærast til Vinnukærunevndina – altso málsræðið hjá Vinnukærunevndini at viðgera ymsu tættirnar í kæruni. Í mun til viðgerðina av sjálvum kærumálinum, so avgjørdi Vinnukærunevndin at staðfesta avgerðina hjá Umhvørvisstovuni at nokta uppafturtøku av góðkenningini av viðkomandi prísavtaluni, sum Umhvørvisstovan grundaði á, at tað ikki fyrilógu nýggjar upplýsingar, sum høvdu havt við sær annað úrslit. Harumframt tók Vinnukærunevndin eisini avgerð um ikki at taka uppaftur avgerðina um at staðfesta avgerðina hjá Umhvørvisstovuni, vísandi til, at ongar nýggjar upplýsingar vórðu lagdar fram, sum høvdu kunna grundað, at málið fekk eitt øðrvísi úrslit, um upplýsingarnar fyrilógu upprunaliga.

LANDSVERK

3 MÁL AVGREIDD

Eitt mál snúði seg um avgerð hjá Landsverki um skelting framvið landsvegi

Málið snúði seg yvirskipað um, at Landsverk hevði sýtt eini kommunu loyvi at seta upp kommunuskelti við ein tunnilsmunna. Vinnukærunevndin avgjørdi at vísa málið aftur til Landsverk til nýggja viðgerð. Avgerðin varð m.a. grundað á, at óvissa varð um ymisk faktuel viðurskifti, sum vórðu mett at vera av avgerandi týdningi fyri viðgerðina av málinum í Vinnukærunevndini.

Annað mál snúði seg um avgerð hjá Landsverki um sýtt loyvi til víðkan av kirkjugarði

Málið snúði seg um, at Landsverk hevði sýtt kommunu loyvi til at víðka um kirkjugarð mótvegis landsvegnum. Avgerðin hjá Landsverki varð í høvuðsheitum grundað á heimild í landsvegalógini at áseta hvussu langt frá landsvegi bygt skal verða. Føroya Kærustovnur staðfesti avgerðina hjá Landsverki og vísti m.a. á, at avgerðin hjá Landsverki at sýta loyvi til víðkan av kirkjugarðinum oman móti landsvegnum varð grundað á saklig og lóglig atlit.

Seinasta málið snúði seg um avgerð hjá Landsverki um at sýta loyvi til íbinding í landsveg og um sýtt loyvi til kommunu at yvirtaka part av landsvegi

Málið snúði seg um, at Landsverk við avgerð hevði sýtt kommunu íbinding í landsveg í sambandi við ætlaða gerð av eini rundkoyring. Avgerðin varð m.a. grundað á, at tað í mun til ferðslutrygd og framkomuleika skulu verða so fáar íbindingar í landavegir sum gjørligt. Partur av avgerðini hjá Landsverki snúði seg eisini um, at sýta kommununi yvirtøku av ávísum vegastrekki av landsvegi. Vinnukærunevndin staðfesti avgerðina hjá Landsverki at sýta kommununi loyvi til íbinding í landsveg í sambandi við gerð av rundkoyring, meðan Vinnukærunevndin avvísti kæruna viðvíkjandi avgerðini hjá Landsverki at sýta kommununi yvirtøku av landsvegastrekki, vísandi til, at Vinnukærunevndin ikki hevði heimild at viðgera kæru um tað ítøkiligu yvirtøkuna av landsvegastrekkinum.

SETANARPRÓGV

2 AVGREIDD MÁL

Ásett er í lógini um setanarprógv, at arbeiðsgevari, undir ávísum umstøðum, hevur skyldu at lata løntakara allar upplýsingar um allar treytir av týdningi fyri setanarvirðuskiftini – setanarprógv.

Í øðrum málinum gav Vinnukærunevndin kæraranum viðhald í, at arbeiðsgevarin ikki hevði hildið sína upplýsingarskyldu mótvegis kæraranum, sbrt. § 2 í lógini um setanarprógv. § 2 í lógini um setanarprógv ásetur m.a., at arbeiðsgevarin hevur skyldu til at lata løntakaranum allar upplýsingar um allar treytir av størri týdningi fyri setanarviðurskiftini. Hitt málið um setanarprógv fall burtur.

ANNAÐ

Málið snúði seg um, hvørt Føroya Kærustovnur hevði heimild at viðgera eina kæru um val av veitara hjá einari kommunu. Føroya Kærustovnur avvísti kæruna vísandi til, at sambært § 2 í løgtingslóg um Føroya Kærustovn er Føroya Kærustovnur kærumyndugleiki fyri fyrisitingarligar avgerðir, tá tað er ásett í løgtingslóg ella við heimild í løgtingslóg. Virksiøkini og ymisku málsøkini eru nærri lýst í kunngerð um starvsskipan fyri Føroya Kærustovn.

GJALD FYRI KÆRUR

Vísandi til § 7 í kunngerð nr. 78 frá 28. august 2008 um vinnukærunevnd er gjald ásett fyri viðgerð av ávísum kærum til Vinnukærunevndina. Kostnaðurin fyri kæruviðgerð er settur til kr. 4.000,00, uttan tá kæran viðvíkur viðurskifti, sum ikki hava samband við tað aktuella ella framtíðar vinnuvirksemið hjá viðkomandi, sum kærir. Í slíkum førum er kostnaðurin kr. 2.000,00.

Í fyrra hálvári 2022 er gjald á kr. 2.000 rindað tvær ferðir. Hetta er væl minni enn í 2021, tá rindað varð kr. 4.000 fýra ferðir. Men havast skal sjálvandi í huga, at gjald einans varð kravt fyrra hálvárið 2022.

Sum áður víst á, so varð Vinnukærunevndin avtikin tann 1. juli 2022 og virkisøkið varð flutt til Føroya Kærustovn. Við nýggju skipanini, har Føroya Kærustovnur er kærumyndugleikin, er gjaldið fyri viðgerð av ávísum kærum avtikið. Sostatt verður einki gjald kravt fyri nakra viðgerð av kærum á vinnuøkinum frá 1. juli 2022 at rokna.

VIÐGERÐARTÍÐIN

Miðal viðgerðartíðin fyri øll avgreidd mál á vinnuøkinum í 2022 varð uml. 5 mánaðir. Í 2021 varð viðgerðartíðin uml. 5 ½ mánaðir. Sostatt varð miðal viðgerðartíðin í 2022 eitt lítið vet styttri enn viðgerðartíðin í 2021. Havandi í huga, at málini á vinnuøkinum oftast eru sera rúgvismikil og trupul samstundis sum atlit eisini skal takast til drúgvar ummælis- og hoyringstilgongdir í sambandi við at upplýsa málini, so verður ein miðal viðgerðartíð á uml. 5 mánaðir mett at vera sera góð.

9/PSYKIATRISKA SJÚKLINGAKÆRUNEVNDIN

NEVNDIN

Limir í Psykiatrisku sjúklingakærunevndini eru:
- Nella Festirstein,
  løgfrøðingur og forkvinna í nevndini
- Jeaneth Løkjá, lækni
- Oda Jóhansdóttir, nevndarlimur

VIÐGERÐARØKIÐ

Kærast kann til Psykiatrisku sjúklingakærunevndina um persónur í sambandi við innlegging á psykiatrisku deild verður útsettur fyri tvingsil.

Hin 1. oktober 2009, tvs. fyri góðum 12 árum síðani, kom nýggj psykiatrilóg í gildi og við henni bleiv rættartrygdin hjá føroysku sjúklingunum á sama støði, sum í hinum norðanlondum. Við hesi lógini, fekk føroyski sjúklingurin nú møguleika at kæra tvingsilsinntriv til eina kærunevnd og fekk tilnevnt ein sjúkligarráðgeva í hesum sambandi.

Psykiatrilógin byggir á tað grundsjónarmið, at tvingsil í samband við innlegging, uppihald og viðgerð á psykiatriskari deild eigur at verða fyribyrgt og sloppið undan so vítt tað yvirhøvur ber til. Hinvegin ber ikki til at sleppa heilt undan tvingsli á hesum økinum. Tað er sambært lógini loyvt at brúka ymisk sløg av tvingsli, tá ið serlig viðurskifti tala fyri tí.

Tvingsilsinntrivini eru til dømis tvingsilsinnlegging, tvingsilsafturhald á deildini, tvingsilsviðgerð, brúk av tvingsilsfastspenning og brúk av kropsligari megi (t.e. at starvsfólk halda sjúklinginum føstum).

Rættartrygdin hjá sjúklingunum er vard við at ein týðandi partur av lógini inniheldur eina rød av ásetingum, ið hava til endamál at avmarka ella, um til ber, at fyribyrgja nýtslu av tvingsli.

Nevndin skal hava tikið avgerð sum skjótast, og innan 7 gerandisdagar aftaná kæran er móttikin, tá talan er um tvingsilsviðgerð. Psykiatriska sjúklingakærunevndin viðger kærur um allar tvingsilsfyriskipanir á psykiatrisku deild.

Allir sjúklingar, sum eru undir tvingsilsfyriskipanum, fáa tilnevnt ein sjúklingaráðgeva. Uppgávan hjá sjúklingaráðgevanum er at vitja sjúklingin, og hava støðugt samband við hann. Ráðgevin skal leiðbeina og geva ráð í øllum viðvíkjandi innlegging, uppihaldi og viðgerð á psykiatrisku deild. Harumframt skal ráðgevin hjálpa sjúklinginum við møguligari kæru og vera hjástaddur, tá ið kæran verður viðgjørd í kærunevndini. Skipanin við sjúklingaráðgevum skal tryggja, at psykiatriskir sjúklingar, sum vera lagdir undir tvingsil, fáa rætt til stuðul og hjálp, bæði menniskjaliga og rættarliga frá óheftum persóni, ið hevur neyðuga førleikan.

NÝGGJ MÁL

Í 2022 vórðu 4 kærur latnar Psykiatrisku sjúklingakærunevndini. Hetta eru nógv færri enn bæði undanfarnu árini, tá ávikavist 13 og 10 kærur vórðu latnar nevndini. Hetta er eisini lægsta tal av kærum til Psykiatrisku sjúklingakærunevndina síðan 2013, tá 3 kærur vóru móttiknar.

Hvør kæra til Psykiatrisku sjúklingakærunevndina inniheldur ofta kærur um fleiri ymisk tvingsilsinntriv og so var eisini hetta árið. Í teimum 4 kærunum varð kært um tilsamans 5 tvingsilsinntriv.



AVGERÐIRNAR

	2020	2021	2022
Tvingsilsinnlegging	3	6	0
Tvingsilsfastspenning	1	0	1
Tvingsilsafturhald	3	7	2
Bráðfeingis sissandi heilivág	2	1	0
Fasthaldan	0	0	0
Tvingsilsviðgerð	3	1	2
Tvungin uppfylging	0	0	0
Annað (uttanfyri heimildarøki)	2	2	0
Í alt	**14**	**17**	**5**

Serstakt fyri hetta árið er, at tríggjar av teimum fýra kærunum vórðu afturkallaðar av kæraranum, áðrenn ætlaða fundin í Psykiatrisku sjúklingakærunevndini. Nevndin viðgjørdi soleiðis bert eitt kærumál, sum innihelt 2 tvingsilsinntriv. Nevndin góðkendi bæði inntrivini.



SJÚKLINGARÁÐGEVAR

Sjúklingaráðgevar hava verið tilnevndir 33 ferðir í 2022, sum er munandi oftari enn í 2021, tá ið sjúklingaráðgevar vórðu tilnevndir 26 ferðir. Tilnevningin av sjúklingaráðgevum fylgir talinum av tvingsilsfyriskipanum, sum eisini eru fleiri í 2022 enn í 2021 .



TVINGSILSFYRISKIPANIR Á PSYKIATRISKA DEPLINUM Í 2022

	2020	2021	2022
Tvingsilsinnlegging	23	14	17
Tvingsilsafturhald	20	10	14
Tvingsilsfastspenning	32	8	13
Tvingsilsviðgerð	7	3	4
Verjutiltøk	0	0	4
Persónlig vernd	1	0	0
Sissandi heilivágur	25	10	20
Fasthaldan	4	0	5
Í alt	**112**	**45**	**77**

Psykiatriski depilin hevur upplýst fyri Føroya Kærustovni, at frá 1. januar til 31. desember 2022 hava 77 tvingsilsfyriskipanir verið tilsamans í mun til 2021, har tað vóru 45 tvingsilsfyriskipanir.

Tølini frá Psykiatriska deplinum vísa, at tvingsilsfyriskipanirnar í 2022 eru munandi fleiri enn í 2021, og munandi lægri enn í 2020. Tann størsti vøksturin er innan fyri sissandi heilivág, sum er tvífalda í mun til 2021.

Hetta samsvarar eisini við tølini fyri tilnevning av sjúklingaráðgevum, har tað vóru 33 tilnevningar av sjúklingaráðgevum í mun til 26 í 2021.

VIÐMERKING

Sum nevnt omanfyri viðgjørdi Psykiatriska sjúklingakærunevndin bert eitt kærumál sum innihelt 2 tvingsilsinntriv og góðkendi nevndin bæði inntrivini. Tríggjar av teimum fýra kærunum vóruð afturkallaðar av kæraranum. Hetta er tað lægsta talið av innkomnum og viðgjørdum kærum síðan 2013.

Frá innkomnu upplýsingunum um tvingsilsfyriskipanum hjá Psykiatriska deplinum fyri 2022 sæst at teirra virksemi er væl hægri enn í 2021 tá ið tað komu 13 kærumál inn, og avgerð var tikin um 17 tvingsilsfyriskipanir.

So tað ber illa til at meta um, hvussu virksemið á Psykiatriska deplinum er, út frá kærunum sum koma til Psykiatrisku sjúklingakærunevndina.

VIÐGERÐARTÍÐIN

Miðal viðgerðartíðin fyri kærurnar hjá Psykiatrisku sjúklingakærunevndini er knappar 5 dagar í 2022, og er hetta ein sera góð viðgerðartíð.

10/SKULDARUMSKIPANARMÁL

Tann 1. juli 2022 varð Skuldarumskipanarnevndin avtikin og virkisøkið flutt til Føroya Kærustovn. Hetta merkir sostatt, at árið 2022 hevur verið tvíbýtt. Fyrra hálvárið 2022 hevur Skuldarumskipanarnevndin verið virkin, meðan virkisøkið hjá Skuldarumskipanarnevndini seinna hálvárið 2022, hevur ligið hjá Føroya Kærustovni.

NEVNDIN

Fyrra hálvárið í 2022 varð Skuldarumskipanarnevndin samansett av trimum limum, tá hon skuldi taka støðu til einstøku málini. Nevndin varð mannað við formanni og 2 nevndarlimum við serkunnleika á viðkomandi øki.

- Jógvan Páll Lassen, lógarkønur og formaður í nevndini
- Jógvan Emil Nielsen, roknskaparkønur og næstformaður í nevndini
- Nella Festirstein, fyrisitingarkøn

VIÐGERÐAREKIÐ

Í skuldarumskipanarmálum viðger Føroya Kærustovnur umsóknir um umskipan av almennari skuld, sí løgtingslóg nr. 29 frá 8. apríl 2005 um umskipan av landsskatta-, mvg- og tollskuld v.m. hjá fólki.

NÝGGJ MÁL

Í 2022 vórðu 14 umsóknir móttiknar. Hetta er nakað tað sama, sum bæði undanfarnu árini, tá 16 umsóknir komu inn til Skuldarumskipanarnevndina.



MÁLINI UPPBÝTT EFTIR SKULDARSLAGI

	2020	2021	2022
Ymisk skuld	4	7	1
Skattaskuld	5	0	5
Mvg	3	2	2
Vinnulán og veðhaldslán	1	0	0
Lestrarlán	1	1	0
Rentur	2	6	6
Í alt	**16**	**16**	**14**

AVGREIDD MÁL

Skuldarumskipanarnevndin hevði fyrra hálvárið 2 fundir og avgreiddi 9 mál.

Seinna hálvárið avgreiddi Kærustovnurin 3 mál um skuldarumskipan. Av hesum fall 1 burtur, áðrenn Kærustovnurin tók støðu til umsóknina. Tvey mál vórðu avgreidd av stjóranum, einum løgfrøðingi og einum serkønum við kunnleika til roknskaparviðurskifti.

Í alt 12 mál vórðu avgreidd í 2022, sum eru nakað minni enn undanfarnu ár, tá ávikavist 16 og 22 mál vórðu avgreidd.



AVGREIDD MÁL UPPBÝTT EFTIR SKULDARSLAGI

	2020	2021	2022
Ymisk skuld	12	1	2
Skattaskuld	3	7	3
Mvg	1	2	3
Vinnulán og veðhaldslán	1	0	0
Lestrarlán	1	1	0
Rentur	3	5	4
Í alt	**22**	**16**	**12**

MÁLINI VÓRÐU AVGREIDD SOLEIÐIS

	2020	2021	2022
Full ella lutvís eftirgeving	11	4	4
Veita gjaldsskáa/avdráttur settur niður	3	0	1
Steðga rentutilskriving	0	5	2
Víst til Skiftirættin, ella privata loysn	0	0	1
Umsókn ikki gingin á møti	0	3	3
Burturfallin mál	8	4	1
Víkja fyri lániskuld, flyta veðbræv í aðra ogn	0	0	0
Í alt	**22**	**16**	**12**

MÁLINI VÓRÐU AVGREIDD SOLEIÐIS



EFTIRGIVIN SKULD

Skuldarumskipanarnevndin eftirgav í alt umleið kr. 2.057.799 í 2022. Skuldin er uppbýtt soleiðis:

Rentuskuld	797.022,16 kr.
Landsskattur	428.403,16 kr.
Mvg-skuld	817.208,50 kr.
AM-gjald	15.165,26 kr.

Tað er torført at seta upp nágreinilig tøl um eftirgevingar, tí ymiskar umstøður gera, at tølini ofta broytast eitt sindur. Rentuskuldin broytist t.d. alla tíðina og tølini kunnu sostatt broytast eitt sindur, frá tí umsóknin kom inn, til avgerðin varð tikin av nevndini.

Tølini fyri eftirgevingar eru munandi hægri í 2022 enn í 2021, tá eftirgevingin var sera lág.

Í málunum, har nevndin hevur samtykt ikki at ganga umsóknini á møti, hevur talan í nógvum førum verið um mál, har skuldin er lítil sæð í mun til ogn og inntøku hjá persóninum, ella at umsøkjarin hevur havt frívirði í fastari ogn. TAKS hevur eisini í nøkrum førum veð fyri skuldini.

Í málunum, har umsøkjarin er biðin um at venda sær til skiftirættin, hevur talan verið um mál, har almenna skuldin hevur verið lítil í mun til privatu skuldina, ella at umsøkjarin hevur skuld til fleiri ymiskar kreditorar, og tá er best um ein samla loysn verður gjørd uppá alla skuldina.

VIÐGERÐARTÍÐIN

Miðal viðgerðartíðin í 2022 var á leið 5½ mánaðir og má sigast at vera góð fyri hetta slagið av málum. Havast skal í huga, at upplýsingar skulu innheintast frá TAKS og umsøkjara umframt, at kommunur skulu taka avgerð um teirra part av skuldini, áðrenn Skuldarumskipanarnevndin kann gera sína niðurstøðu. Til samanberingar kann nevnast, at miðal viðgerðartíðin í 2021 var 4½ mánaðir og í 2020 á leið 6½ mánaðir. Viðgerðartíðin á hesum øki hevur annars fyrr ofta ligið á uml. 8 mánaðum.

11/HØVUÐSBARNAVERNDAR-NEVNDIN

NEVNDIN

Í Høvuðsbarnaverndarnevndini sita:
- Birita Ludvíksdóttir, løgfrøðingur og forkvinna
- Rókur av Fløtum Jespersen, sálarfrøðingur
- Ingvør Justinussen, barnasakkøn

VIÐGERÐAREKIÐ

Høvuðsbarnaverndarnevndin viðger mál um:
- Umsorganaryvirtøku
- Samveru
- Familjuviðgerð
- Bráðfeingisavgerðir

UMSORGANARYVIRTØKA OG LONGD FYRISKIPAN

Við ársenda í 2022 vóru í alt 86 umsorganaryvirtikin børn í Føroyum. Av hesum vóru 69 í fosturheimi, 15 børn vóru á stovni í Føroyum, og 2 børn vóru á stovni uttanlands.

Við ársenda í 2022 vóru harumframt 9 ung í aldrinum 18 – 21 í longdari fyriskipan. Av hesum vóru 4 ung í fosturheimi, 3 ung á stovni ella stovnslíknandi fyriskipan í Føroyum og 2 ung á stovni uttanlands.

Tað eru sostatt 11 færri børn, ið vóru umsorganaryvirtikin við árslok 2022 samanborið við 2021, og 1 fleiri ung/ungur, ið var í longdari fyriskipan við árslok 2022 samanborið við 2021.

TAL AV UMSORGANARYVIRTIKNUM BØRNUM OG UNGUM Í LONGDARI FYRISKIPAN



BÚSTAÐUR HJÁ UMSORGANARYVIRTIKNUM BØRNUM



BÚSTAÐUR HJÁ UNGUM Í LONGDARI FYRISKIPAN



MÓTTIKIN TILMÆLI OG AVGERÐIR TIL GÓÐKENNINGAR



AVGERÐIR

Tilsamans 86 mál vórðu móttikin og viðgjørd í Høvuðsbarnaverndarnevndini í 2022. Talið er munandi minni enn í 2021 og 2020, tá ávikavist 129 og 141 mál vórðu viðgjørd.

Málini snúgva seg millum annað um umsorganaryvirtøku av børnum, um samveru millum somu børn og foreldur teirra ella onnur, um inn- og útskrivan av stovni, um familjuviðgerð ella um góðkenning av bráðfeingis avgerðum hjá barnaverndarnevndunum. Harumframt verða nevndu fyriskipanir regluliga endurskoðaðar av Høvuðsbarnaverndarnevndini.

Talið av málum samsvarar hvørki við talið av avgerðum ella talið av børnum, tí sama mál kann fevna um bæði umsorganaryvirtøku og samveru við ymiskar partar, ella um familjuviðgerð til eina familju við fleiri børnum. Harumframt kann tilmæli viðvíkjandi einum barni verða lagt fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til støðutakan fleiri ferðir um árið.

Í 2022 tók Høvuðsbarnaverndarnevndin tilsamans 176 avgerðir. Hetta eru eisini munandi færri enn í 2021 og 2020, tá talið av avgerðum var ávikavist 272 og 318.

Tiknu avgerðirnar í 2022 snúðu seg um 74 børn. Talið av børnum var til samanberingar 104 í 2021 og 106 í 2020.

Samanumtikið boðað hagtølini frá 2022 frá, at virksemið í Høvuðsbarnaverndarnevndini í 2022 hevur verið munandi minni enn undanfarin ár.

Tað er óvist, hví virksemið hevur verið minni í 2022 enn undanfarin ár. Tað kann tó staðfestast, at nógv færri tilmælir um umsorganaryvirtøku (fyrstu ferð) vórðu send Høvuðsbarnaverndarnevndini í 2022 enn undanfarin ár. 4 tilmælir vórðu send Høvuðsbarnaverndarnevndini samanborið við 17 tilmælir í bæði 2021 og 2020.

Harumframt vóru eisini munandi færri tilmælir um endurskoðan av verandi umsorganaryvirtøku send Høvuðsbarnaverndarnevndini í 2022 enn í 2021 og 2020. Í 2022 vórðu 27 tilmælir um endurskoðan av umsorganaryvirtøku viðgjørd, meðan talið í 2021 og 2020 var ávikavist 49 og 55. Tað verður ásett í avgerðunum hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini, nær barnaverndartænastan skal leggja málið fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til endurskoðan. Hendan endurskoðanarfreistin er í flestu førum 1 ella 2 ár.



AVGERÐIR Í MUN TIL TILMÆLI



BØRN



ALDURSBÝTI Á BØRNUNUM



FYRISKIPANIR



UMSORGANARYVIRTØKA

Allar avgerðir hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini eru grundaðar á tilmæli frá barnaverndartænastunum kring landið. Høvuðsbarnaverndarnevndin hevur sostatt ikki møguleika at taka mál upp av sínum eintingum.

Tá Høvuðsbarnaverndarnevndin avger, at barn skal verða umsorganaryvirtikið, fevnir avgerðin eisini um, hvørt barnið skal setast í fosturfamilju ella á stovn.

Í 2022 vórðu 3 børn umsorganaryvirtikin fyri fyrstu ferð. Av hesum 3 børnunum vórðu 2 børn sett í fosturfamilju, meðan 1 varð sett á stovn. Aldursbýtið á teimum 3 børnunum var frá 5 til 15 ár. Í øllum trimum málum bleiv umsorganaryvirtøkan framd við samtykki frá foreldramyndugleikanum. Barnið, ið var 15 ár, gav somuleiðis samtykki til umsorganaryvirtøkuna.

Í einum máli avgjørdi Høvuðsbarnaverndarnevndin ikki at taka undir við tilmælinum um umsorganaryvirtøku av einum barni, tí grundarlag ikki var fyri umsorganaryvirtøkuni. Ein umsorganaryvirtøka av einum barni er ein sera inntrívandi avgerð. Av hesi orsøk kann ein umsorganaryvirtøka einans fremjast, um tað er neyðugt, og tá ið fyribyrgjandi fyriskipanirnar ikki verða mettar at kunna skapa eitt nøktandi úrslit fyri barnið.

Børn kunnu verða varandi umsorganaryvirtikin, um tað má metast at vera sannlíkt, at foreldrini varandi ikki eru før fyri at geva barninum nøktandi umsorgan, ella um barnið, eftir at tað hevur verið til fosturs í minst 5 ár, hevur fingið so sterkt tilknýti til hesi, at tað er av stórum týdningi og best fyri barnið, at tað verður verandi hjá fosturforeldrunum.

Tvey børn blivu varandi umsorganaryvirtikin í 2022. Í báðum førum bleiv tann varandi umsorganaryvirtøkan framd við samtykki frá foreldramyndugleikanum.

Í einum máli tók Høvuðsbarnaverndarnevndin ikki undir við tilmælinum um varandi umsorganaryvirtøku, og umsorganaryvirtøkan bleiv tí í staðin longd fyribils. Umsorganin kann bert verða tikin varandi frá foreldrunum, um tað ikki er møguligt at seta aðrar og lagaligari fyriskipanir í verk, ella um slíkar fyriskipanir hava verið royndar, men ikki givið úrslit.

Á STOVN UTTANLANDS

Høvuðsbarnaverndarnevndin ansar eftir, at barn verður sett á rættan samdøgursstovn. Um einki nøktandi tilboð finst í Føroyum, kann barn verða sett á stovn uttanlands.

Tvey umsorganaryvirtikin børn og ein ungur persónur í longdari fyriskipan vórðu sett á stovn uttanlands í 2022 – øll í Danmark. Av hesum vóru tvey børn/ung, ið frammanundan vóru umsorganaryvirtikin/í longdari fyriskipan við uppihaldi á stovni uttanlands. Eitt barn/ung bleiv sostatt fyri fyrstu ferð sett á stovn uttanlands í 2022.

SAMVERA

Høvuðsbarnaverndarnevndin ásetur samveru við umsorganaryvirtikin børn.

Barnið hevur rætt til samveru við bæði foreldur uttan mun til foreldramyndugleika, og harumframt kann barnið hava ásetta samveru við ommur, abbar, systkin, fyrrverandi fosturforeldur ella onnur, ið standa tí nær.

Hóast dentur verður lagdur á, at umsorganaryvirtikin børn kenna sína familju og sítt upphav, kann samvera í serligum førum verða noktað foreldrunum í styttri ella longri tíðarskeið. Hetta hendi í 4 avgerðum í 2022. Í einum føri tók Høvuðsbarnaverndarnevndin ikki undir við tilmælinum hjá barnaverndartænastuni um at nokta samveru millum barn og foreldur.

Tess eldri og meira búgvið barnið er, tess størri ávirkan kann barnið hava á, hvussu samveran verður skipað.

FAMILJUVIÐGERÐ

Høvuðsbarnaverndarnevndin kann innskriva familjur til samdøgurs- ella dagviðgerð á Familjudeplinum undir Eind 10 í Almannaverkinum. Familjuviðgerð á Familjudeplinum er ein fyribyrgjandi fyriskipan, har foreldur við menningarmøguleikum kunnu fáa munagóða hjálp í rættari tíð, umframt at møguleiki er fyri at kanna førleikarnar hjá foreldrunum nærri.

Í 2022 varð ein familja við 2 børnum innskrivað til viðgerð á Familjudeplinum sum samdøgurstilboð.

AVGERÐIR UM UNG YVIR 18 ÁR, SUM HALDA FRAM Í FYRISKIPAN

Umsorganaryvirtøka heldur uppat tá tann ungi fyllir 18 ár.

Høvuðsbarnaverndarnevndin kann tó avgera, at tann ungi kann halda fram í longdari fyriskipan undir barnaverndarlógini, um tørvur er á stuðli eina tíð aftrat, fyri at tann ungi skal kunna megna eina sjálvstøðuga vaksnamannatilveru. Tað er til dømis ikki óvanligt, at ung halda fram í longdari fyriskipan, til tey hava lokið miðnámsprógv.

Fyriskipanin kann bert halda fram, um tann ungi ynskir tað. Somuleiðis endar longda fyriskipanin beinanvegin, um tann ungi ynskir tað.

Longd fyriskipan undir barnaverndarlógini eigur bert at verða longd, um tað er sannlíkt, at tann ungi fer at megna eina sjálvstøðuga vaksnamannatilveru. Um tað til dømis er sannlíkt, at tann ungi fer at hava varandi tørv á bústovni undir Almannaverkinum, verður tann ungi ikki settur í longda fyriskipan, men eigur at fáa tilboð eftir forsorgarlógini.

Í 2022 vórðu 9 avgerðir tiknar um longda fyriskipan.

Harumframt tók Høvuðsbarnaverndarnevndin tvær avgerðir viðvíkjandi broyting av verandi longdu fyriskipan. Í eina førinum bleiv longda fyriskipanin í fosturheimi broytt til eina stovnslíknandi fyriskipan. Í hinum førinum avgjørdi Høvuðsbarnaverndarnevndin, at heimild ikki var fyri at broyta longdu fyriskipanina við uppihaldi á stovni til uppihald í fosturheimi.

BRÁÐFEINGIS AVGERÐIR OG AVGERÐIR UM LÆKNAKANNING OG VIÐGERÐ

Barn kann verða tikið úr heiminum uttan rættarúrskurð, um vandi er fyri, at tað verður skatt av at verða verandi í heiminum. Eisini kann foreldrum verða noktað at fáa barn heimaftur, um vandi er fyri, at barnið verður skatt, um tað fer heim. Somuleiðis kann ein bráðfeingis avgerð verða tikin, um eitt barn er uttan umsorgan, tvs. at eingin er at taka sær av barninum.

Tað er barnaverndarnevndin í økinum, ið tekur bráðfeingis avgerðina. Avgerðin skal leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til góðkenningar beinanvegin, og í seinasta lagi 2 yrkadagar eftir at hon er tikin.

Um bráðfeingis avgerð verður góðkend av Høvuðsbarnaverndarnevndini, kann avgerðin í mesta lagi standa við í 4 mánaðir. Í tí tíðarskeiðinum eigur barnaverndartænastan at kanna umstødurnar hjá barninum og foreldrunum, soleiðis at støða kann verða tikin til, hvørt barnið eigur at fara heim aftur, ella um tað eigur at verða umsorganaryvirtikið.

Harumframt kann barnaverndarnevndin – uttan rættarúrskurð - taka avgerð um, at barn skal til hóskandi kanningar og viðgerð, um orsøk er at halda, at eitt barn hevur eina lívshóttandi ella álvarsama sjúku ella skaða, er fyri kynsligum ágangi ella øðrum harðskapi, og um samtykki ikki fæst frá foreldramyndugleikanum ella barni, ið er fylt 15 ár, til at barnið kemur til kanningar ella viðgerð.

Í 2022 viðgjørdi og góðkendi Høvuðsbarnaverndarnevndin eina bráðfeingis avgerð.

Somuleiðis viðgjørdi og góðkendi Høvuðsbarnaverndarnevndin eina avgerð um kanning og viðgerð av einum barni.

BARNAVERNDARØKINI

Føroyar eru deildar í 8 barnaverndarøki við tilhoyrandi barnaverndartænastum:

- Barnaverndartænastan fyri Tórshavnar kommunu
- Barnaverndartænastan fyri Norðoyggjar
- Barnaverndartænastan fyri Suðuroynna
- Barnaverndartænastan fyri Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu
- Barnaverndartænastan við Skálafjørðin
- Barnaverndartænastan í VEKS-samstarvinum millum Vestmanna-, Eiðis-, Kvívíkar- og Sunda kommunur
- Barnaverndartænastan í Vágum
- Barnaverndartænastan fyri Sandoyar og Skúvoyar kommunur

Tað eru barnaverndartænasturnar, ið leggja mál um t.d. umsorganaryvirtøku fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina, ið síðani tekur endaliga avgerð í málunum.

Í alt vóru 86 børn umsorganaryvirtikin og 9 børn vóru í longdari fyriskipan við ársenda 2022. Ábyrgdin av málunum viðvíkjandi hesum børnunum var soleiðis deild millum barnaverndarøkini:





Í 2022 móttók Høvuðsbarnaverndarnevndin 86 tilmælir og bráðfeingis avgerðir til góðkenningar. Hesi vóru býtt soleiðis millum barnaverndartænasturnar:



Høvuðsbarnaverndarnevndin tók 176 avgerðir í 2022. Hesar avgerðir vóru soleiðis býttar millum barnaverndartænasturnar:



Sum tað sæst er sera stórur munur á, hvussu stórt virksemi er í teimum ymisku barnaverndartænastunum – bæði í mun til tilmælir og avgerðir.

Ein orsøk kundi verið tann stóri munurin á fólkatalinum í teimum átta barnaverndarøkjunum. Tað er tó greitt, at hóast hædd verður tikin fyri muninum í fólkatalinum, so er sera stórur munur á virkseminum í teimum ymisku barnaverndarøkjunum. Tað er tí trupult at vísa á nakra ávísa orsøk til, hví virksemi er størri í ávísum barnaverndarøkjum í mun til onnur.

VIÐGERÐARTÍÐ

Í 2022 gingu í miðal 20 dagar frá at tilmæli varð móttikið á Føroya Kærustovni, til Høvuðsbarnaverndarnevndin hevði tikið avgerð í málinum. Tá eru atlit ikki tikin til, at mál til dømis eru móttikin í ferium, ella at foreldur av ymsum orsøkum hava ynskt mál útsett. Viðgerðartíðin var tann sama í 2022 í mun til 2021.

Tá mál til Høvuðsbarnaverndarnevndina er móttikið á Føroya Kærustovni, verður tað kannað og viðgjørt av løgfrøðingi, áðrenn tað verður lagt fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina á fundi, har viðkomandi partar hava møguleika at møta.

Høvuðsbarnaverndarnevndin tekur síðani avgerð í málinum, og verður skrivliga avgerðin send viðkomandi pørtum skjótast til ber. Høvuðsbarnaverndarnevndin er saman á fundi 3. hvørja viku.

Tá Høvuðsbarnaverndarnevndin móttekur eina bráðfeingis avgerð frá einari barnaverndartænastu til góðkenningar, tekur Høvuðsbarnaverndarnevndin støðu til bráðfeingis avgerðina innan tveir gerandisdagar - í flestu førum sama dag ella dagin eftir.

KÆRUR

Kærur um avgerðir hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini verða lagdar fyri Føroya Rætt. Í 2022 blivu 7 avgerðir hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini kærdar til Føroya Rætt.

Kæran kann fevna um alla avgerðina ella ein part av avgerðini. Til dømis kunnu foreldur kæra avgerð um samveru, hóast tey ikki kæra avgerð um umsorganaryvirtøkuna.

Tá kæra er móttikin, skipar skrivstovan hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini fyri, at málið verður lagt fyri Føroya Rætt. Føroya Rættur tilnevnir kæraranum advokat í sambandi við rættarmálið.

Úrslitið av viðgerðunum hjá Føroya Rætti av avgerðunum hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini var soleiðis:

	2020	2021	2022
Avgerð staðfest	14	10	6
Avgerð ikki staðfest	0	0	0
Avgerð lutvíst staðfest	0	1	0
Kæra tikin aftur av kærara	5	0	0
Kæra ikki viðgjørd enn	0	0	1

Tveir dómar, avsagdir av Føroya Rætti í 2022, blivu skotnir inn fyri Eystara Landsrætt av kærara. Hvørgan av hesum eru enn blivnir viðgjørdir av Eystara Landsrætti.

12/KÆRUNEVNDIN HJÁ ARBEIÐSLOYSISSKIPANINI OG BARSILSSKIPANINI

NEVNDIN

Í kærunevndini hjá Arbeiðsloysisskipanini eru tríggir limir. Í nevndini sita:

- Kristina Samuelsen, advokatur og forkvinna
- Jón Hestoy, stjóri og nevndarlimur
- Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag og nevndarlimur (sáli)

VIÐGERÐARØKIÐ

Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini viðger kærur um avgerðir hjá Arbeiðsloysisskipanini eftir løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing og kærur um avgerðir hjá Barsilsskipanini eftir løgtingslóg nr. 48 frá 3. apríl 2002 um barsilsskipan.

NÝGGJ MÁL

Í 2022 komu 5 nýggjar kærur inn til Kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini. Fýra av málunum snúðu seg um útgjald úr Arbeiðsloysisskipanini, og eitt mál snúði seg um útgjald úr Barsilsskipanini.

Talið av nýggjum kærum er tað sama sum í 2021 men lægri enn í 2020, tá 8 kærur komu inn til nevndina. Meðan kærurnar í 2020 í stóran mun snúðu seg um lønarískoyti frá korona-skipanini, snúgva kærurnar í 2022 seg um ymisk onnur viðurskifti, ið hava við útgjald úr teimum báðum skipanunum at gera.



AVGREIDD MÁL

Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini hevði 4 fundir í 2022 og avgreiddi 7 mál. Tá eru tvey mál við, sum eru komin inn í 2021.



BÝTIÐ AV AVGREIDDUM MÁLUM

	2022
Karantena í samband við útgjald úr ALS	3
Játtanartíðspunkt fyri ALS-útgjaldi	1
Ov nógv útgoldin arbeiðsloysisstuðul	1
Barsilspeningur sýttur	1
Útrokningargrundarlag fyri barsilsútgjaldi	1
Í alt	**7**

AVGREIÐSLAN

Kærunevndin hevur avgreitt 7 kærur hetta árið. Av hesum vórðu 4 avgerðir staðfestar, ein varð broytt, ein partvíst broytt og ein kæra fall burtur.



VIÐGERÐARTÍÐIN

Í 2022 var miðal viðgerðartíðin hjá Kærunevndini fyri Arbeiðsloysisskipanina og Barsilsskipanina áleið 3½ mánaðir. Hetta er hálvan mánaða styttri enn undanfarna ár. Ein viðgerðartíð á 3½ mánaðir má metast at vera góð, tí viðgerðartíðin verður roknað frá tí degi, málið er innkomið til Kærustovnin, til tað er avgreitt á fundi, og sostatt skulu atlit m.a. takast til krøvini til málsupplýsing og partshoyring. Tó er trupult at staðfesta nakað yvirskipað í mun til miðal viðgerðartíð, tá talið á málum er so avmarkað.

SERLIGA ÁHUGAVERD MÁL

Sýtt barsilspening í samband við stjúkbarnaættleiðing

Mál nr. 22/01307

Í hesum málinum søkti kærarin um barsilspening fyri tvey ættleidd børn. Børnini vóru skrásett sum børn hjá øðrum av foreldrunum, og talan var sostatt um stjúkbarnaættleiðing.

Barsilsskipanin noktaði at rinda barsilspening og vísti á, at talan var ikki um ættleiðing av fremmandum børnum, grundað á, at sambært Landsfólkayvirlitinum hava børnini síðan føðing havt sama bústað sum kærarin og er talan tí ikki um ættleiðing, ið er fevnd av § 10 í barsilslógini.

Kærarin setti spurnartekin við tulkinginina av § 10 í barsilslógini.

Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini staðfesti avgerðina hjá Barsilsskipanini. Mett varð, at § 10 í barsilslógini ikki er galdandi fyri ættleiðing av barni, sum longu er skrásett sum barn hjá einum av foreldrunum. Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini metti, at soleiðis sum greinin er orðað, má tað merkja, at talan skal vera um eitt barn, sum foreldrini fáa, og ikki eitt barn, sum annað av foreldrunum eigur frammanundan. Kærunevndin metti ikki, at § 10 leggur upp til, at greinin eisini skal fevna um børn, ið verða ættleidd, sum longu eru skrásett sum børn hjá einum av foreldrunum.

13/TVINGSILSNEVNDIN

NEVNDIN

Tá avgerðir skulu takast í Tvingsilsnevndini luttaka í flestu málum formaðurin og tveir serkønir nevndarlimir. Formaðurin ger av, hvørjir av serkønu nevndarlimunum skulu luttaka í nevndarviðgerðini. Í serligum førum kann avgerð takast um, at fleiri enn tveir serkønir limir luttaka í viðgerðini. Skeiðið hjá formanni, varaformanni og serkønu limunum gongur til 1. januar 2024, tá virkisøkið verður flutt til Føroya Kærustovn sambært § 16, stk. 5 í løgtingslóg um Føroya Kærustovn.

Í nevndini sita í løtuni:

- Eli Thorsteinsson, advokatur og formaður
- Súsanna Nordendal, løgfrøðingur og varalimur fyri formannin

Harumframt eru fleiri serkønir limir útnevndir av avvarðandi yrkisfeløgum, sum formaðurin kann velja ímillum til at viðgera ymisku málini.

VIÐGERÐARØKIÐ

Tvingsilsnevndin hevur víttfevnandi málsøki, ið fevnir um bæði nógv og ymisk mál. Virksemið hjá Tvingsilsnevndini er í høvuðsheitum skipa í Løgtingslóg nr. 73 frá 25. mai 2020 um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin (tvingsilslógin). Tvingsilsnevndin tekur bæði støðu til, um tilmæli um tvingsilsinntriv frá kommunum og Almannaverkinum kunnu góðkennast, samstundis sum nevndin eisini viðger kærur um framd tvingsilsinntriv og ávísar avgerðir hjá myndugleikunum.

Tvingsilsnevndin viðger tilmæli um:

- Flyting uttan samtykki
- Ávaringar- og peilingarskipan
- Serlig upplatingarskipan til úthurð
- Halda persóni aftur og føra hann aftur
- Halda persóni føstum í sambandi við reinføri o.a.
- Nýtsla av hjálparráði
- Forða fyri atgongd til og eftirlit við nýtslu av internet og telefon
- Kanning av býli og ognarlutum
- Leggja hald á ognarlutir
- Læsa býli um náttina

MÓTTIKIN MÁL

Í 2022 eru 14 mál innkomin til Tvingsilsnevndina og snúðu øll málini seg um tilmæli til góðkenningar, meðan eingin kæra er móttikin. 2022 er annað árið, har Tvingsilsnevndin virkar og tískil er einans árið 2021 at samanbera við. Í 2021 móttók nevndin eisini 14 mál. Væntað varð, at talið á móttiknum málum fór at verða nakað størri bæði í 2021 og 2022. Í ársfrágreiðingini hjá Tvingsilsnevndini fyri 2021 varð vístá, at Almannaverkið og kommunalu samstørvini, sum í stóran mun varða av økinum, helst skuldu finna seg til rættis í nýggju skipanini við Tvingsilsnevndini og løgtingslógini um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin. Nú skipanin við Tvingsilsnevndini hevur verið virkin í meira enn 2 ár kann staðfestast, at talið á móttiknum málum ikki er so stórt sum upprunaliga væntað. Um talið á móttiknum málum lýsir veruligu støðuna á økinum, er ilt hjá Tvingsilsnevndini at meta um, hetta tá Tvingsilsnevndin ikki virkar sum eftirlitsmyndugleiki.



AVGREIDD MÁL

Tvingsilsnevndin hevði 10 fundir í 2022, har 14 mál vórðu avgreidd.

Sum myndin niðanfyri vísir, so eru flestu tilmælini, sum eru latin Tvingsilsnevndini í 2022 góðkend og hetta er eisini í tráð við undanfarna ár. 11 av teimum 14 tilmælunum, sum vórðu løgd fyri Tvingsilsnevndina í 2022 vórðu góðkend, meðan 1 tilmæli varð afturtikið av myndugleikanum.

2 av tilmælunum, sum vórðu løgd fyri Tvingsilsnevndina í 2022 vórðu ikki góðkend av Tvingsilsnevndini. Hesar avgerðir hjá Tvingsilsnevndini og nakrar av aftanfyri liggjandi grundgevingunum verða viðgjørdar nærri niðanfyri.

AVGREIÐSLAN HJÁ TVINGSILSNEVNDINI AV TILMÆLUM



AVGREIÐSLAN

Tvey av tilmælunum, sum Tvingsilsnevndin viðgjørdi í 2022, valdi Tvingsilsnevndin ikki at góðkenna. Hóast málini bæði grundleggjandi vórðu ymisk, so snúðu bæði málini seg um inntriv sambært § 8 í tvingsilslógini (peilingar- og ávaringarskipanir). Báðar avgerðirnar høvdu eisini tað til felags, at tilmælini ikki blivu góðkend, tí Tvingsilsnevndin metti, at myndugleikin ikki hevði víst á endamálið við inntrivunum varð at verja fyri einum ítøkiligum vanda fyri borgaran sjálvan ella fyri onnur vísandi til § 8, nr. 1 og 2 í tvingsilslógini. Bæði málini høvdu eisini tað til felags, at endamálið við ætlaðu nýtsluni av inntrivinum varð at hjálpa borgarunum sjálvum og hinum íbúgvunum á stovnunum har borgararnir búðu, soleiðis at ávísar óhepnar støður ikki íkomu.

Talan varð sostatt um eina ætlaða nýtslu av inntrivi, hvørs endamál Tvingsilsnevndin metti vórðu grundaði á púra sjálvsøgd umsorganar- og røktaratlit til borgararnar sjálvan og aðrar íbúgvar á stovnunum har borgararnir búgva. Talan varð tó ikki um nakran ítøkiligan vanda, soleiðis sum treytirnar í § 8, nr. 1 og 2 í tvingsilslógini eru at skilja.

Tvingsilsnevndin hevur áður í ymiskum høpi gjørt vart við ymisk viðurskifti, sum Tvingsilsnevndin hevur mett møguliga ótilætlaði og kunnu hava við sær óhepnar avleiðingar.

Tvingsilsnevndin vísir á, at møguleikarnir hjá Tvingsilsnevndini at góðkenna tilmæli um inntriv, eru avmarkaðir, tá endamálið treytaleyst skal vera at verja fyri einum vanda. Tvingsilsnevndin vísir á, at tað kunnu vera umstøður í ítøkiligum málum um peilingar- og ávaringarskipanir sambært § 8, har endamálið við ætlaða inntrivinum er at røkja púra grundleggjandi røktar- og umsorganaratlit, men har Tvingsilsnevndin ikki kann góðkenna tilmæli, tí talan ikki er um at verja fyri einum ítøkiligum vanda. Líknandi umstøður gera seg eisini galdandi í øðrum málum, t.d. tá talan er um mál um hjálparráð sambært § 12. Tvingilsnevndin hevur áður í ymiskum høpi víst á ymisk viðurskifti í sambandi við tvingsilslógina, sum møguliga kundi verið endurskoðaði og rættaði til.



Talvan omanfyri vísir samlaðu avgreiðsluna av málum hjá Tvingsilsnevndini býtt á ymisku myndugleikarnar, sum kunnu leggja tilmæli fyri Tvingsilsnevndina. Myndugleikarnir eru nágreinaðir í § 2, nr. 2 í tvingsilslógini og eru hesir í høvuðsheitum Almannaverkið og tey 8 kommunalu samstørvini á eldraøkinum. Talvan vísir rættiliga greitt, at Almannaverkið hevur lagt nógv flest tilmæli fyri Tvingsilsnevndina. Hinir 8 myndugleikarnir, sum eru kommunalu samstørvini, hava hvør sær lagt fá tilmæli fyri Tvingsilsnevndina, meðan einstakir myndugleikar als eingin tilmæli hava lagt fyri Tvingsilsnevndina.

VIÐGERÐARTÍÐ

Miðal viðgerðartíðin í 2022 var knappar 23 dagar. Í málum hjá Tvingsilsnevndini eru oftast freistir ásettar í tvingsilslógini um, nær avgerð í seinasta lagi skal vera tikin. Hendan freistin er í flestu málum 30 dagar, meðan freistin í serligum málum kann vera 14 dagar. Ein miðal viðgerðartíð á 23 dagar er undir øllum umstøðum at meta sum nøktandi.

Á HEIMASÍÐUNI HJÁ FØROYA KÆRUSTOVNI KANST TÚ LEITA EFTIR AVGERÐUM Á 8 YMISKUM MÁLSØKJUM.

EISINI BER TIL AT SÍGGJA NÆR FUNDUR VERÐUR OG LESA NÆRRI UM VIRKSEMIÐ Á STOVNINUM.

WWW.FKS.FO

FØROYA KÆRUSTOVNUR ER ÓHEFTUR STOVNUR UNDIR LØGMANSSKRIVSTOVUNI.

KJARNUUPPGÁVAN ER AT VIÐGERA KÆRUR UM AVGERÐIR HJÁ ALMENNUM MYNDUGLEIKUM.

Føroya Kærustovnur · Undir Hornabakka · Postsmoga 45 · 110 Tórshavn
Tel. 32 05 85 · fks@fks.fo · www.fks.fo